# GERÐABÓK

**Dato:** 23. mars 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 57/23 – 86/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Birita Baldvinsdóttir Iversen
Helena Dam á Neystabø

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
David Andrésen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**

Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 200<br><br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 57/23 | 23/01539-2 | Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 23. mars 2023 | 202 |
| 58/23 | 23/01790-2 | Súnu Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 23. mars 2023 | 203 |
| 59/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 204 |
| 60/23 | 23/01418-2 | Afturkeyp av matr. nr. 255cu, Argir | 206 |
| 61/23 | 23/01484-2 | Afturkeyp av matr. nr. 255dp, Argir | 208 |
| 62/23 | 22/07313-7 | Afturkeyp av matr. nr. 255dk, Kirkjubøur-Argir (Útstykking Klingurstjørn 2) | 210 |
| 63/23 | 23/01374-2 | Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2023 | 212 |
| 64/23 | 20/04156-1 | Val av 5 limum í musikkskúlanevndina | 214 |
| 65/23 | 23/00877-1 | Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2022 hjá Westward Ho | 215 |
| 66/23 | 21/02924-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium | 217 |
| 67/23 | 22/07077-3 | Áheitan um at leingja leigumálið og lække leigugjaldið hjá "Tøkum Lætt" í Skansastovu matr. nr. 620a | 222 |
| 68/23 | 23/00097-1 | Hoyvíksvøllur - Nýtt graslíki v.m. | 225 |
| 69/23 | 23/00940-1 | Betra ymsar umstøður hjá Musikkskúlanum - løgujáttan 2023 | 229 |
| 70/23 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 231 |
| 71/23 | 23/01129-1 | Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn | 242 |
| 72/23 | 22/02439-7 | Áheitan um at gongubreytir verða gjørdar á Gríms Kambansgøtu, Tórshavn | 244 |
| 73/23 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 246 |
| 74/23 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 254 |
| 75/23 | 21/03047-1 | Tórsvøllur Torg | 265 |
| 76/23 | 21/01366-1 | Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík | 272 |
| 77/23 | 22/01036-1 | Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022 | 277 |
| 78/23 | 22/07300-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn | 282 |
| 79/23 | 22/07295-1 | Miðbýarætlan – Býarlundin | 285 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 80/23 | 22/04373-4 | Almannamálaráðið : Umsókn um grundøki til vardar bústaðir | 289 |
| 81/23 | 18/00173-1 | Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali | 292 |
| 82/23 | 23/01128-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 18, Hoyvík - Frá D1 til D3 | 297 |
| 83/23 | 23/01130-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá - Matr. nr. 18, Hoyvík | 299 |
| 84/23 | 22/05301-4 | Umsókn um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 56ch, Kvíggjartún 8 og 10 á Argjum | 301 |
| 85/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 303 |
| 86/23 | 21/01258-2 | Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking | 305 |

**Til viðgerðar**

## 57/23 Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 23. mars 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 57/23 | 23/01539-2 |

**Málslýsing**
Bjørg Dam hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 58/23 Súnu Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 23. mars 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 58/23 | 23/01790-2 |

**Málslýsing**
Súna Mørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Helena Dam á Neystabø, eru loknar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 204 |
| | Formansins merki: |

# 59/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 60/23 Afturkeyp av matr. nr. 255cu, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 86/23 | 23/01418-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 60/23 | 23/01418-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarar hava í teldubrævi boðað frá, at tey ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Grundstykkið matr.nr. 255cu, Kirkjubøur/Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )

Vídd 400m2. Skeytið tinglýst 28.04.2020 Keypsprísur kr. 682.000,00 men hava keyparar seinni fingið afturflutt fyri eina regulering í keypsprísinum kr. 60.400, soleiðis at endaligi nettokeypsprísurin var kr. 621.600,-

Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Eigarar hava keypt eini sethús og hava tískil ikki tørv á grundstykkinum longur.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytan, og rinda verandi eigarar tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

22/05336. Byggiloyvi til sethús á grundstykkinum.
19/00054. Tillutan av grundstykkinum. Skeyti v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla. |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 621.600,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan reguleraðan sølupris kr. 621.600,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 208<br><br>Formansins merki: |

# 61/23 Afturkeyp av matr. nr. 255dp, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 87/23 | 23/01484-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 61/23 | 23/01484-2 |

**Upprunin til málið.**

Eigari hevur í teldubrævi boðað frá, at hann umhugsar at lata stykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Grundstykkið matr.nr. 255dp, Kirkjubøur/Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )
Vídd 402m2. Skeytið tinglýst 09.03.2020. Keypsprísur 624.708,00
Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Umsøkjari upplýsir, at bygging av sethúsum verður nógv dýrari enn væntað, og hevur nú ætlanir um at kanna aðrar møguleikar fyri bústaðarloysn.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytin, og rindar verandi eigari tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

22/02907. Byggiloyvi.
21/00079. Skjøl í samband við keyp. Skeyti v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 209<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | | Keyp og søla | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 624.708,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri sølupris kr. 624.708,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 62/23 Afturkeyp av matr. nr. 255dk, Kirkjubøur-Argir (Útstykking Klingurstjørn 2)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 96/23 | 22/07313-7 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 62/23 | 22/07313-7 |

**Upprunin til málið.** Kommunan hevur rykt uppá byggifreist.

**Lýsing av málinum.**

Grundstykki matr.nr. 255dk, Kirkjubøur,Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )
Vídd 402m2. Skeytið tinglýst 11.02.2020
Keypsprísur 685.410,00 men hava keyparar seinni fingið afturflutt fyri eina regulering í keypsprísinum kr. 60.7025, soleiðis at endaligi nettokeypsprísurin var kr. 624.708,-

Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytan, og rinda verandi eigarar tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

Kommunan hevur rykt uppá byggifreist. Eigarar hava havt byggiloyvi til grundstykkið, sum var galdandi í tvey ár, men er byggiloyvið farið út um freist. Eigarar boða nú frá, at tey ikki hava møguleika til at halda byggifreistina, eisini vísandi til, at annar av eigarunum nú fer undir lestur, og at tey tí ongan møguleika hava til at fara undir bygging komandi tvey árini. Eigarar heita tískil á kommununa um at keypa stykkið aftur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 211<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | | Keyp og Søla | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 624.708,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan reguleraðan keypsprís kr. 624.708,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 63/23 Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 63/23 | 23/01374-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lýsing av málinum – samandráttur Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017, verður nevndin í P/F Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

§ 3. Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin. Stk. 2. Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2. Stk. 3. Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:
1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.
2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur
3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu
4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu
5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin
6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin
Stk. 4. Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at *“nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir.”*

Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at *“Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum.”*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 213<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt at velja Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra, í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

# 64/23 Val av 5 limum í musikkskúlanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 15/21 | 20/04156-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 168/21 | 20/04156-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 64/23 | 20/04156-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. reglugerð frá 30. september 2009 um Tórshavnar Musikkskúla, velur býráðið fimm nevndarlimir í eina musikkskúlanevnd, ið hevur til endamáls at fremja áhugamál skúlans. Eisini arbeiðir nevndin fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Í nevndini sita: Rói B. Poulsen, Uni Árting, Malan Eyðunsdóttir, Malan Thomsen, Jens Marni Hansen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu Halla Samuelsen, Høgni Midjord í Stovuni, Petur Frank Holm, Høgni Reistrup og Malan Eyðunsdóttir.

**Ískoyti:**
Høgni Midjord hevur boðað frá at hann tekur seg úr nevndini og tí skal annar limur veljast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim í musikkskúlanevndina.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Vald varð Sára Gullfoss.

**Ískoyti:**
Høgni Reistrup hevur boðað frá at hann tekur seg úr nevndini og tí skal annar limur veljast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim í musikkskúlanevndina.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Valdur varð Jákup Petur Eliasen.

# 65/23 Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2022 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nevndin fyri Westward Ho | 20.02.2023 | 1/23 | 23/00877-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 88/23 | 23/00877-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 65/23 | 23/00877-1 |

**Upprunin til málið**
Roknskapurin fyri 2022 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2022 verður framlagdur.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Nevndin fyri Westward Ho 20. februar 2023: Roknskapurin góðkendur og undirskrivaður.**

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Roknskapurin góðkendur og beindur í býráðið til góðkenningar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 66/23 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.07.2021 | 196/21 | 21/02924-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 111/22 | 21/02924-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.10.2022 | 207/22 | 21/02924-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 272/22 | 21/02924-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 234/22 | 21/02924-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 21.03.2023 | 69/23 | 21/02924-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 95/23 | 21/02924-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 66/23 | 21/02924-1 |

**Upprunin til málið**
Økja plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild

**Lýsing av málinum**
Í 2019 var útboð um útbygging av tveimum dagstovnum – Dagstovninum á Hamrinum við tveimum stovum og Býlingshúsinum vesturi á Flat við fýra stovum. Býráðið samtykti í tí umfarinum bert at byggja út Býlingshúsið vesturi á Flat.

Stór útstykkingarætlan er í umbúna oman fyri Argjahamar. Í uppskoti hevur verið at byggja nýggjan stovn við síðuna av Dagstovninum á Hamrinum, men annar møguleiki er at taka uppaftur verkætlanina og tilboðið, sum Búsetur vann, um at byggja út Dagstovnin á Hamrinum tó broytt til fimm stovur, ið økir plásskapasitetin við 76 plássum (36 vøggustovupláss og 40 barnagarðsstovupláss).

<u>Lýsing av plásstørvi</u>
Gjørd er nýggj greining av plásstørvinum í Tórshavnar kommunu her og nú og komandi árini, sí skjal. Tilflyting og høg burðatøl seinastu árini gera, at átrokandi tørvur er á fleiri vøggu- og barnagarðsstovuplássum í kommununi bæði her og nú og komandi árini.

Í juni 2021 eru umleið 1.780 stovnspláss í Tórshavnar kommunu 0-6 ár. Talan er um umleið 560 vøggustovupláss og 1.220 barnagarðsstovupláss.

Sbrt. greiningini er tørvurin her og nú á 100-120 fleiri vøggustovuplássum og 90-100 fleiri barnagarðsstovuplássum. Tá er talt við, at á fleiri stovnum eru ov nógv børn inni enn stovnurin er bygdur til, at nógv børn eru 1,5-2 ár, áðrenn tey byrja á stovni (hava bíðað eftir plássi), og aftur onnur, sum eru á ynskilista uttan yvirhøvur at bílagt pláss í skipanini.

Verða hesi stovnsplássini útvegað afturat, hevði plásskapasiteturin verið 660-680 vøggustovupláss (560 í dag) og 1.310-1.320 barnagarðsstovupláss (1.220 í dag).

Um burðatølini árini 2022-2027 vera sum undanfarnu árini uml. 300 um árið og við somu tilflyting uml. 1,5% um árið, so veksur plásstørvurin eitt vet aftrat.

Aftrat avbjóðingini við plásstroti er starvsfólkatrot.

Útbyggja plásskapasitetin
Við Miðstovninum koma nýggj pláss aftrat væntandi um ársskiftið ella stutt eftir. Eftir summarfrítíðina lata nakrar stovur upp í Hoydølum, sum tó er tíðaravmarkað loysn.

Umframt verkætlanina á Hamrinum og seinni Dagstovninum á Argjum, eru aðrir dagstovnar, sum kunnu tillagast og byggjast út til tess at økja plásskapasitin. Hetta verður lýst nærri eftir summarfrítíðina eisini í hvønn mun tað loysir seg í mun til íløguna.

Stóri vøksturin í Hoyvík ger tað tó eisini alneyðugt at byggja nýggjan og helst ríkiliga stóran dagstovn har komandi árini.

Viðvíkjandi útbyggingarætlanini Dagstovnurin á Hamrinum er uppskot um at fáa í lag samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta útbyggingarætlan við støði í tilboðnum frá 2019, sí kostnaðarmeting (skjal).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykkingarætlanin oman fyri Argjahamar
Vegatkoma frá rundkoyringini Glyvursvegur/Hamarin
Dagstovnurin á Argjum
Útbygging av Dagstovninum á Hamrinum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tørvin á dagstovnaplássum nú og framyvir
Kostnaðarmeting/tilboð útbygging á Hamrinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla nevndini til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019 at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 05. juli 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur tikið upp samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019.

Tillagingar eru gjørdar í verkætlanini. Dagstovnurin á Hamrinum er broyttur til 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, felagsøki og køk, starvsfólkarúm í miðjuni í bygninginum. Støddin er uml. 1.297m2, 6 stovur tilsamans.

P/F Búsetur boðar frá, at teir klára at byggja dagstovnin fyri uppruna m2 kostnaðin við index regulering. Tá er byggingin í samsvari við byggiskrá frá 13-03-2019.

Avbjóðingar hava verið við atkomuvegi og parkeringsøki rundanum nýggja tilbygningin á Dagstovnin á Hamrinum, tí stórur hæddarmunur er á lendinum og trongt er at útbyggja verandi parkeringspláss.

Avtalað er við Búsetur at gera arbeiðsvegin niðan til komandi Dagstovnin á Hamrinum. Parkeringspláss og atkomuvegur er ikki við í hesum prosjekti, men ein heildarætlan er gjørd fyri økið, har ið hetta arbeiðið verður gjørt liðugt seinni.

Parkeringsviðurskiftini til núverandi Dagstovnin á Hamrinum eru sum nú er í minna lagi. Umsitingin mælir til, at parkerings- og trafikkviðurskiftini skulu vera nøktandi og loyst, áðrenn verkætlanin er liðug. Talan er um tvífaldan tørv av parkeringsplássum, sum fáast skulu til vega.

Uml. kr. 450.000 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til spælipláss. Hetta er ikki nøktandi til at gera eitt fullgjørt og nútíðarhóskandi spælipláss. Meiri peningur má tí setast av til hetta seinni.

Tilboð frá P/F Búsetur við indexregulering og við øllum er kr. 54.038.606,00 v/ kommunalum mvg.

Innanfyri ein samlaðan karm uppá kr. 57 mió mvg íroknað er fíggjað arbeiðsvegur, tryggingar, listprýði, íbindingar v.m.

Tó er atkomuvegur, parkeringspláss og liðugtgerð av spæliplássi ikki íroknað.

Í sambandi við útbyggingina er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Fígging**
Tøkur peningur er kr. 31.000.000 á íløgujáttan innan grein 3 Børn og ung. Møguleiki er at fíggja kr. 10.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2023, og at játta restupphæddina uppá kr. 16.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Samtykt verður at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.

- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um at byggja út Dagstovnum á Hamrinum.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 57.000.000, fíggjað soleiðis:
    - kr. 30.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum,
    - 1.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31013 Nýggjur dagstovnur á Argjum,
    - kr. 10.000.000 verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2023,
    - restupphæddin kr. 16.000.000 verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024, og at
    - fíggingin verður flutt til nýggja verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- Heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting av byggisamtyktini fyri økið.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Koma broytingar fyri skal málið fyri nevnd aftur.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Enmælt samtykt.

**Ískoyti**
Avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum. Atkoma og byggipláss liggja inni á arbeiðstøkumarkinum at gera útstykkingina oman fyri Argjahamar (ÚOA) hjá MT Højgaard Føroyar (hereftir MTH) við undirarbeiðstakaranum RTS Bygging. Atkoman og byggiplássið kunnu eftirfylgjandi gerast partur av atkomu og parkeringsøki til tann útbygda dagstovnin á Hamrinum.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við MTH um at gera hetta arbeiðið sum eykaarbeiði við somu eindarprísum sum í verkætlanini ÚOA. Hetta er játtað og endaliga tilboðið frá MTH er kr. 1.940.252,50 við mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Samtykt verður at fylgja omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av omanfyristandandi tilboði hjá MTH.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 1.940.252,50 kr við mvg. fíggjað soleiðis:

- Verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar leggur út fyri omanfyri lýsta jørðarbeiðið í 2023.
- Kr. 1.940.252,50 við mvg verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2024.
- Fíggingin verður flutt til verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum endurrindar í 2024 verkætlanini L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar fyri goldin útlegg. Verkætlanarleiðarin fyri L64019 hevur ábyrgd av at gera eina uppgerð innan 1. mars 2024 og at senda uppgerðina til fíggjardeildina.

-At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 67/23 Áheitan um at leingja leigumálið og lækka leigugjaldið hjá "Tøkum Lætt" í Skansastovu matr. nr. 620a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 57/23 | 22/07077-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 70/23 | 22/07077-3 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 67/23 | 22/07077-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan um at leingja leigumálið og lækka leigugjaldið hjá "Tøkum Lætt" í Skansastovu matr. nr. 620A.

**Lýsing av málinum**
Tann 7. juli 2022 er sáttmáli er gjørdur millum Tórshavnar kommunu og "Tøkum Lætt", um at felagið leigar hølini á niðastu hædd í Skansastovu. Leigumálið er galdandi til 1. januar í 2025.

Nú 2 onnur feløg eisini skulu verða í Skansastovu, ynskir Tøkum lætt at leingja leigumálið við einari 10-20 ára avtalu.

Fyri "Tøkum Lætt" er endamálið við at leingja sáttmálan, at tryggja seg longri inn í framtíðina, tí tey kenna seg eitt sindur ótryggan við hvat hendir við felagnum, um tey standa við ongum 1. januar 2025.

Sambært sáttmálanum rindar "Tøkum Lætt" 1.200,00 kr. um mánaðin, ið svarar til 80,00 kr. pr. fermetur pr. ár. Harumframt rindar felagið 1.000,00 kr. um mánaðin fyri olju og el-nýtslu.

Sambært felagnum fer nærum alt limagjaldið til at gjalda leigu. Sostatt heitir felagið á Tórshavnar kommunu um at lækka leigukostnaðin, so felagið betur fær hugsavnað seg um teirra almannagagnliga virksemi innan dansimentan.

**Um "Tøkum Lætt"**
Dansifelagið "Tøkum Lætt" var stovnað 7. november 1993. Endamálið við felagnum er at menna tann føroyska dansin.

Í løtuni eru uml. 200 limir og dansa verður annaðhvørt sunnukvøld. Harumframt er barnadansur sunnukvøld.

Limagjaldið er 200 kr. fyri støk og 300 kr. fyri pør.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tørvur er á heildarviðgerð av leigugjøldum til feløg, sum leiga frá kommununi og frá privatum, so at gjøgnumskygni er um leigutreytir v.m.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda seg til verandi sáttmála, og boða "Tøkum Lætt" frá, at leigumálið verður tikið upp aftur í 2024. Harumframt verður mælt til, at umsitingin ger uppskot til felags reglur viðvíkjandi leigugjøldum v.m., tá feløg leiga frá kommununi ella frá privatum.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:**
Samtykt at leingja sáttmálan við Tøkum lætt 10 ár fram, og at leigugjaldið verður tikið av. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at inntøkan á kontu 6109 Umsiting og røkt av bygningum lækkar kr. 14.400 um leigugjaldið dettur burtur.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum til málið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Jákup Dam, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Gunnvør Balle, ið viðmerktu, at tær ynsktu at serstøða teirra verður feld í gerðabókina, og har tey føra fram, at býráðið átti at hildið seg til verandi sáttmála og boða «Tøkum Lætt» frá, at leigmálið verður tikið upp aftur í 2024. Harumframt verður mælt til, at umsitingin er uppskot til felags reglur viðvíkjandi leigugjøldum v.m., tá feløg leiga frá kommununi ella frá privatum.

# 68/23 Hoyvíksvøllur - Nýtt graslíki v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 18/23 | 23/00097-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 5/23 | 23/00097-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.02.2023 | 28/23 | 23/00097-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 37/23 | 23/00097-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 40/23 | 23/00097-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 61/23 | 23/00097-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 72/23 | 23/00097-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 68/23 | 23/00097-1 |

**Upprunin til málið**
Graslíkið á Hoyvíksvølli er illa farið.

**Lýsing av málinum**
Stórar avbjóðingar hava verið við graslíkinum á Hoyvíksvølli. Í 2020 bleiv staðfest, at vøllurin losar sera illa og hevur hetta serliga tvær fylgir. Tann eina er, at tað flýtur við leysum kunstgrasi kring allan vøllin, og hevur hetta umhvørvisligar fylgir. Fyri tað næsta hevur vøllurin losað somikið illa, at tað eru fleiri støð, har onki graslíki er, og gongur hetta út yvir kvalitetin og trygdina hjá teimum, ið brúka vøllin. Í løtuni koyrir sostatt ein reklamatións-sak millum TK og veitaran av graslíkinum.

Sbrt. mál 22/06615 (Eykajáttan av meirinntøkum 2022) samtykti býráðið tann 24. november 2022 at seta kr. 5 mió. av til vøllin í Hoyvík.

Í 2022 skifti kommunan graslíkið inni í Vika. Í hesum førinum er talan um ein umhvørvisvinarligan vøll við kork-infill, ið er góðkendur av FSF til Betri-deildina. Royndirnar higartil hava verið góðar, leikararnir dáma væl vøllin, og sjálvt korkið hevur hátta sær væl, bæði tá tað kemur til vind, regn og frost. Hetta er sama slag av graslíki sum er í Norðragøtu og har hava tey havt góðar royndir við vøllinum síðani 2021.

Sostatt kunnu vit út frá 1-2 ára royndum staðfesta, at hesin graslíkisvøllurin við kork-infill higartil er ein góð loysn.

Velur kommunan eina loysn við korki til Hoyvíksvøll, so má gerast nakað ið tað stóra hallið, sum er á vøllinum (hægstur á miðjuni). Hallið á vøllinum er somikið høgt, at stórur vandi er fyri, at korkið fer at renna oman ímóti bak- og síðulinju, tá tað regnar illa. Hetta fer eisini at gera røktina av vøllinum truplari.

Við støði í, at eisini Hoyvíksvøllur skal hava umhvørvisvinarligt infill, er neyðugt at fáa hallið burtur, og ikki er greitt, hvørjum standi undirlagið er frammanundan. Her er sostatt ein óvissa í mun til kostnaðarmetingina, sum má kannast nærri.

Umframt at skifta graslíkið v.m., er ætlanin at fáa gjørd onnur arbeiði við Hoyvíksvøll til tess at betra um umstøðurnar. Partur av hesum er at gera fyrireikandi uppskot um nýggj felagshøli og áskoðaraskýli við vøllin samsvarandi krøvunum til kappinrgarfótbólt í bestu deildini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | Blað nr.: 226 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Formansins merki: |

FSF vallarreglugerðin fyri 2023.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tilboð og kostnaðarmeting liggur í málinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 5775 | LK57036 | Vøllur í Hoyvík |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 5775 | L570xx | Vøllur í Hoyvík | Ja |

| **Upphædd** |
|---|
| 5.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 5.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at heimila umsitingini at fáa til vega tilboð uppá graslíksvøll við kork-infill frá í minsta lagi tveimum veitarum at leggja aftur fyri nevnd, og at kannað verður nærri, hvussu verandi undirlag (hallið og ójavnar) kann rættast upp.

Harumframt verður mælt til, at partur av játtanini verður brúktur til at betra um aðrar umstøður við Hoyvíksvøll, herundir at fáa uppskot til nýggj felagshøli og áskoðaraskýli v.m. Mælt verður somuleiðis til at játta kr. 5.000.000 av løgukarmi 5775 LK57036 Vøllur í Hoyvík til nýggja løgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum við tí broyting, at heimilað verður umsitingini at fáa til vega tilboð uppá graslíkisvøll við kork-infill sum tann á Argjum at leggja fyri nevnd.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tk hevur fingið tilboð frá P/F Føroya Møblasølu uppá graslíkisveiting av merkinum DOMO (Niðurlendskt merki), sí hjálagt. Talan er um júst sama slag av graslíki, ið er lagt inni í Vika í 2022 og í Norðragøtu í 2021.

Báðir vøllirnir eru brúktir til landskappingardystir í Betri-deildini. Tó metir umsitingin, at samskifti við FSF skal takast upp, fyri at FSF kann góðkenna verkætlanina, áðrenn hon fer endaliga í gongd.

Í mun til tilboðið til graslíkisvøllin inni í Vika í fjør, so er ein ávís príshækking. T.d. er prísurin pr. fermetur hækkaður 12%, og svarar tað til óvanliga høgu príshækkingina, sum hevur verið í 2022. Samstundis er vøllurin í Hoyvík 8.556 $m^2$, meðan vøllurin inni í Vika er 7.208$m^2$.

Ein fyribils kostnaðarmeting liggur í málinum, við útgangsstøði í tilboðnum frá DOMO. Tá loysn við kork-infill verður vald, so eru krøv til hallið á vøllinum. Er hallið ov stórt, kann korkið renna av vøllinum saman við regninum. Staðfest er, at hallið er ov stórt á Hoyvíksvølli, og tí skal ein vídd á 8.556$m^2$ javnast betur út. Í hesum liggur størsta avbjóðingin og óvissan við kostnaðarmetingini, tí neyvar kanningar av lendinum eru ikki gjørdar enn.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til innkomna tilboðið ella um fleiri tilboð skulu fáast til vega. Um samtykt at taka av tilboðnum um graslíkið v.m., so eisini at játta kr. 5 mió av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg L57036 Vøllur í Hoyvík til nýggja løgukontu L57036 Vøllur í Hoyvík, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. februar 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur undir við, at graslíkið verður skift, men at tað eigur at verða bjóðað út.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meirluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum frá minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og meirilutanum í fíggjarnevndini um at taka av tilboðnum uppá graslíkið og at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg LK57036 til L57036 Vøllur í Hoyvík

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært kostnaðarmetingin frá umsitingini, ið liggur málinum, kostar verkætlanin við at gera undirlendið og skifta graslíkið á Hoyvíksvølli 7.425.000 kr.

Umframt tilboðið frá DOMO, eru aðrir kostnaðir s.s. burturbeining, undirlag/planering, ymisk gjøld, ráðgeving o.a. við í kostnaðarmetingini. Kostnaðarmetingin byggir á kostnað fyri liknandi verkætlan, við teimum príshækkanum sum hava verið hetta seinasta árið.

Størsta óvissan í hesi verkætlanini liggur í lendisarbeiðnum! Inn er komið tilboð frá fyritøku um at gera lendisarbeiðið og liggur tað tilboðið tætt at kostnaðarmetingini hjá umsitingini. Óvissan liggur í, at til ber ikki heilt meta um, hvussu lendið sær út undir vøllinum, og hetta kann geva avbjóðingar, tí fermetratalið lendinum er so stórt.

Játtaðar eru higartil 5.000.000 kr. til verkætlanina, men samlaða kostnaðurin er mettur til 7.425.000 kr.

Umsitingin skjýtur upp at fíggja tær manglandi 2.425.000 kr. soleiðis av kontu 5775 Ítróttaanlegg:
- LK57040 Gundadalshøllin kr. 425.000
- LK57041 Innandura spælipláss kr. 1.000.000
- LK57042 Tórsbreyt kr. 1.000.000

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2.425.000 til løgukontu 5775 L57036 Vøllur í Hoyvík sambært uppskotinum omanfyri, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við málinum, og at umsitingin ger nýtt uppskot til fígging at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina í mentamálanevndini omanfyri. Umsitingin skjýtur upp, at kr. 2.425.000 verður játtaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg L57018 Fimleikahøll í Kaldbak. Tøk játtan í 2023 til hallarbyggingina í Kaldbak er kr. 14,2 mió, og mett verður, at lægri játtan í ár ávirkar ikki hallarbyggingina.

Upphæddin kr. 2.425.000 verður so at játtað aftur í íløguætlanini fyri 2024.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja uppskotið soleiðis:
- at játtað verður kr. 2.425.000 til løgujáttan 5775 Ítróttaanlegg L57036 Hoyvíksvøllur graslíki av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg L57018 Fimleikahøll í Kaldbak,
- at játtað verður kr. 2.425.000 í íløguætlanini fyri 2024, og
- at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 69/23 Betra ymsar umstøður hjá Musikkskúlanum - løgujáttan 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 53/23 | 23/00940-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 69/23 | 23/00940-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 69/23 | 23/00940-1 |

**Upprunin til málið**
Løgujáttan.

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á at gera tillagingar á øki uttanfyri Tórshavnar Musikkskúla. Mentamáladeildin og stjórin á Tórshavnar musikkskúla eru komin í samráð til at skilabest er at raðfesta niðanfyri standandi øki.

**1.Tillagingar á útiøkið**
Talan er um rættingar fyri trygd á útiøkið sambært ferðsluserfrøðingi Mikkel Heide Frandsen, serliga viðvíkjandi at lýsa økið betur upp. Haraftrat tillagingar í av/áseting og uppmerkingar.
Mettur kostnaður kr. 300.000.

**2.Skjótihurð og hálvtak við bakdyr.**
Sum kunnugt eru høvuðsdyrnar ikki í brúki. Verandi bakdyr megna ikki trýstið av fólki inn/út í skúlanum, og einki hálvtak er, so fólk fáa regn og kava frá glasfasaduni niður á seg. Tørvur er á einum veggi/hálvtaki í sambandi við verandi bakdyr. Mettur kostnaður kr. 150.000.

**3.Manglar online elektronisk lás.**
Fleiri hurðar (25 stk) mangla online elektronisk lás, og tí ber illa til at stýra brúkið av hølum á nøktandi hátt Mettur kostnaður kr. 50.000.

**4.Nýggj ljós- og ljóðskipan í Hátúni**
Ynski er um at betra upplivingina í Hátúni munandi við nýggjari ljós- og ljóðtøkni. Ynski er um at fáa ljós m.a. til pallin, sum til ber at stýra í fjarstøðu, tí einki ljósloft er. Á ljóðøkinum er ynski um hátalarar og forsterkarar, sum deila ljóðið runt allan salin. Ætlanin er at seta kr. 500.000 av til hetta, ið er bert ein partur av samlaðum tørvi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til gerðarættarmál í sambandi við høvuðsdyrnar á Tórshavnar Musikkskúla.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 230<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5175 | LK51001 | Musikkskúli | 5175 | | Musikkskúli | L51001 | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og Mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.000.000 til tey fýra nevndu endamálini av løgukarmi 5175 LK51001 Musikkskúli til nýggja løgukontu 5175 L51001 Musikkskúli, og beina málið í býrðáðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 70/23 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |
| 25 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 127/19 | 16/01715-2 |
| 26 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 216/20 | 16/01715-2 |
| 27 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 200/20 | 16/01715-2 |
| 28 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 167/20 | 16/01715-2 |
| 29 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 242/20 | 16/01715-2 |
| 30 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 193/20 | 16/01715-2 |
| 31 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 34/21 | 16/01715-2 |
| 32 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 52/21 | 16/01715-2 |
| 33 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2021 | 56/21 | 16/01715-2 |
| 34 Mentamálanevndin | 24.03.2021 | 68/21 | 16/01715-2 |
| 35 Fíggjarnevndin | 25.03.2021 | 72/21 | 16/01715-2 |
| 36 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 106/21 | 16/01715-2 |
| 37 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 49/23 | 16/01715-2 |
| 38 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 16/01715-2 |
| 39 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 68/23 | 16/01715-2 |
| 40 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 70/23 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir bygginGina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Í fjør samtykti býráðið treytað skeyti og ætlanarskriv við ÍSF. ÍSF er ikki komið á mál við innanhýsis tilgongdini hvørt felagsskapurin byggir nýtt høvuðssæti við Ovara vøll í Gundadali.

Fyri at tryggja at ætlanin um bygging av langhyli kann byrja og fyri at ÍSF kann fáa eitt sindur longri skotbráð til at avgera spurningin um nýtt høvuðssæti, var í juli 2020 var fundur millum ÍSF og TK í sambandi við málið um staðseting av nýggjum ÍSF-húsi.

ÍSF er ikki enn komið á mál við tilgongdini um nýtt ÍSF-hús. Av tí at tað ikki er endaligt, um ÍSF vil byggja við Ovara vøll ynskir felagsskapurin at kunna kapitaliserað tað virði, sum annars lág í virðinum í ætlaðu staðsetingini (byggibúning og sambygging). Hetta var í 2019 mett til 3,55 mio.kr. ÍSF hevur tí ynski um at leingja skotbráðið til at fara undir bygging eitt ár afturat í mun til áður ásetta dato í 2024. T.v.s. at ÍSF skal hava gjørt galdandi hetta endurgjaldið innan 31. desember 2025, tá tað eisini verður evsta freist fyri at felagsskapurin er farin undir at byggja við Ovara vøll.

Sí hjálagt
a). Dagført skeyti
b). Dagført ætlanarskriv
c). Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti

Stjórn í ÍSF hevur principielt tikið undir við hesum skjølunum, men skal sbrt. lógunum hjá felagsskapinum leggja tað fyri á eykaaðalfundi til góðkenningar og verður tað ætlandi um umleið 3 vikur.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at innganga hjálagda skeyti, ætlanarskriv og sáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
ÍSF hevði eykaaðalfund 16. september 2020 til at taka støðu til endaligu skjølini.

Eykaaðalfundurin ynskti og samtykti eina minni broyting í skjalinum 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti'.

Talan er um umorðingar, sum innibera, at í tann mun, at ÍSF ikki ger álvara av at byggja við Ovara vøll í Gundadali, so skal TK bjóða ÍSF eitt annað hóskandi byggibúgvið grundstykki. Meðan orðingarnar frammanundan ikki innibóru eina skyldu til at royna tað, men at TK kundi velja at gera tað.

Hinvegin so stendur óbroytt við, at um partarnir ikki semjast um tann møguleikan, so fær ÍSF endurgjald á 3,55 mio.kr. fyri útreiðslur, ið TK annars ætlandi hevði havt av byggibúning av øki sunnanfyri og vestanfyri skýlið við Ovara vøll í Gundadali, umframt sambygging við sjálvt skýlið. ÍSF kann gera hetta endurgjald galdandi frá 1. januar 2021 og inntil 31. desember 2025.

Umsitingin metir at henda broytingin ikki broytir grundleggjandi uppá tað, sum er ætlanin yvirfyri ÍSF og tí kann gerast.

Fyri at tað skal vera samsvar millum samtyktina hjá ÍSF og hana hjá kommununi er neyðugt at staðfesta broytingina. Sí hjálagt dagført skjal 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Hini bæði skjølini (skeyti og ætlanarskriv), ið vóru samtykt á seinasta fundi, standa við óbroytt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja dagførda skjalið 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1’. Málið verður beint býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi 21. januar 2021 heitir ÍSF á kommununa um at fara undir tilgongd, har nýtt høvuðssæti til ÍSF verður bygt oman á FIMI í Gundadali. ÍSF vísir á, at nú ÍSF húsast i fyribilshølum, er tørvur á at fáa gongd á endaliga hølisloysn skjótast gjørligt bæði til virksemið hjá ÍSF og sersmbondum í ÍSF.

Kommunan og ÍSF hava í fleiri umførum samskift um nýtt høvuðssæti til ÍSF. Í hesum sambandi eru tvey ætlanarskriv gjørd, har tað í 2016 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti oman á Fimi, og í oktober 2020 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti við skýlið á Ovara vølli í Gundadali.

Ynskið er sostatt at venda aftur til upprunaligu ætlanina. FIMI er ítróttabygningur, sum mentamálanevndin varðar av.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera áheitanina frá ÍSF, og beina málið um staðseting av nýggjum ÍSF høvuðssæti oman á FIMI í byggi- og býraskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við staðseting oman á Fimi og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt og mælir til at hoyra Havnar Fimleikarfelag og Fimleikafelagið Ljósið.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir at fáa málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt hoyra virkandi feløg og at leggja málið fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Ískoyti og tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
15. mars 2021 var fundur við umboð fyri virkandi fimleikafeløgini í Fimi, Havnar Fimleikafelag og Ljósið. Umboðini vístu á stóra tørvin á fleiri og betri umstøðum at venja fimleik í, serliga vísti umboðini fyri Ljósið á vánaligu umstøðurnar, sum fimleikafelagið hevur í fimleikahøllini í Sankta Frans skúla, og umboðið fyri Havnar Fimleikafelag vísti á, at teirra úrvalsfimleikarar mugu til Runavíkar og Klaksvíkar at venja, tí tey mangla tímar í Fimi. Nógv íðka fimleik, og tað er av stórum týdningi, at fimleikurin verður hugsaður inn í verandi hølir í kommununi, og í komandi út-/nýbyggingar.
Somuleiðis vístu umboðini á, at tað sera óheppið, um møguleikin at vaksa um fimleikavirksemið í Gundadali verður steðgað, grundað á, at bygt verður til okkurt annað virksemið omaná Fimi. Borgarstjórin lovaði, at feløgini vera kallaði innaftur, tá tekningar fyriliggja viðv. bygging av ÍSF omaná FIMI.

Fyri kommununa er málið viðv. ÍSF somuleiðis týðandi at fáa loyst, tí felagsskapurin er undir stórum trýsti og er staðsetingin av nýggja bygninginum týðandi fyri at felagsskapurin hevur nakað ítøkiligt at arbeiða fram ímóti.

Í sambandi við um verandi bygging (Fimi) tolir at verða bygt omaná, so gjørdu MT Højgaard útrokningar hesum viðvíkjandi í 2008, sí viðhefta skjal 16/01715-90 Utrokningargrundarlag, sum somuleiðis er at finna í j. nr. 2008-4245/118.
Útrokningarnar vísa, at tað er møguligt at byggja tvær hæddir oman á verandi bygging. Hesar hæddir skulu gerast sum lættar konstruktiónir.

Gundadalur er í dag rættiliga tætt bygt, og verður mett, at virksemið hjá ÍSF væl kann verða staðsett aðrastaðni enn oman á Fimi. Fimi húsar fimleikinum, og um fimleikurin skal víðkast í økinum, so er upplagt at tað verður gjørt við, at byggja omaná Fimi. Um møguleikin at víðka um virksemið verður steðgaður við at byggja ÍSF oman á Fimi, so verður mett, at fimleikurin eigur at verða hugsaður inn í framtíðar verkætlanir innan ítróttin.
Tað er skilligt, at ÍSF ynskir at verða staðsett í Gundadali, tí stórur partur av ítróttarvirkseminum í kommununi er her, og sostatt vil virksemið, sum felagsskapurin umboðar síggjast aftur í uttanumhvørvinum. Spurningurin er bara, um felagsskapurin sær møguleikar í at verða staðsett aðrastaðni í Gundadals-økinum, her verður t.d. hugsað um møguleikan at byggja hølir til ÍSF kring Tórsbreyt, um breytin verður víðkað við einum bygningi, ella um ein bygging verður bygd omaná parkeringsøkið út móti R.C. Effersøes gøtu. Hesar nevndu staðsetingarnar eru ikki neyvt kannaðar, men býarskipanarliga verður mett, at hesar staðsetingarnar yvirskipað eru betri egnaðar til virksemið í mun til at “kroysta” virksemið inn í Gundadalsøkið, umframt at møguleikin at víðka um fimleikavirksemið tá ikki verður steðgaður.

Av tí at málið er átrokandi at fáa loyst, og aðrar staðsetingar enn omaná Fimi ikki hava verið umrøddar við ÍSF, umframt at teirra ynski hevur verið at verða staðsett oman á Fimi, so verður mett ráðiligt, at mæla til

at staðseta ÍSF oman á Fimi. Tó hevði verið ynskiligt, um aðrar staðsetingar somuleiðis vórðu umrøddar við ÍSF.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta ÍSF omaná Fimi, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar og í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annnfinn Brekkstein og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam og Ruth Vang, tekur ikki undir við tilmælinum á verandi grundarlagi vísandi til at aðrir møguleikar fyri staðseting í Gundadali eiga at verða kannaðir.

**Mentamálanevndin 24. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini at kanna aðrar staðsetingar í Gundadali, ið fall við fýra atkvøðum fyri, sjey ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Blankt atkvøddi: Jákup Dam.

**Ískoyti:**
ÍSF hevur sett í gongd arbeiði at fáa til vega skipanaruppskot fyri ÍSF-húsinum. ÍSF hevur í hesum sambandi gjørt uppskot, har ÍSF-húsið er staðsett á allari víddini á Fimi-bygninginum, hetta samsvarandi ætlanini.

FSF hevur í hesum sambandi gjørt vart við, at UEFA í sambandi við góðkenningar av Tórsvølli sum altjóða stadion hevur ynski um, at útivallaráskoðarar til altjóða landsdyst eru á øki fyri seg, ið eisini er tað vanliga aðrastaðni. Metingin hjá UEFA er, at tað á Tórsvølli hóskar seg best at skipa øki til útiáskoðarar við norðurendan og harvið omaná parti av Fimi.

ÍSF, FSF og kommunan hava síðani umrøtt, hvørjar tillagingar kunnu gerast í skipanaruppksotinum, sum taka hædd fyri bæði tørvi og ynskjum hjá ÍSF viðvíkjandi ÍSF-húsinum og FSF saman við kommmuni viðvíkjandi Tórsvølli sum altjóða góðkent stadion.

At gera broytingar í skipanaruppskotinum fer at kosta kr. 340.000. Vísandi til, at tað eru atlitini til Tórsvøll, sum gera tað neyðugt hjá ÍSF at broyta skipanaruppskotið, er FSF saman við kommununi sinnað at gjalda hetta, har FSF og kommunan rinda hvør sína helvt, t.e. kr. 170.000.

Skotið verður upp at figgja hetta av løgukontu 6175 L61026 ÍSF-húsið kr. 50.000 og løgukontu 5275 LK 52002 Kvøldskúlin kr. 120.000, og at flyta samlaðu upphæddina kr. 170.000 til kontu 5717 Ítróttaanlegg.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 50.000 av løgukontu 6175 L61026 ÍSF-húsið og kr. 120.000 av løgukontu 5275 LK 52002 Kvøldskúlin til endamálið og at flyta samlaðu upphæddina til kontu 5717 Ítróttaanlegg. Málið at beina í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Elsa Berg taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 242 |
| | | Formansins merki: |

# 71/23 Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 13/23 | 23/01129-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 82/23 | 23/01129-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 71/23 | 23/01129-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarar á Myllutjørn hava gjørt vart við fleiri manglar í býlinginum. Hesir umfata asfaltering, gøtur, vegamerking, ferðslutrygd (spegl og skeltir) og liðguggerð av skráum o.l.

**Lýsing av málinum**
Eigarafelagið á Myllutjørn hevur heitt á TK um at fáa fleiri viðurskifti viðvíkjandi ferðsluni í býlinginum í rætt lag og gjørt avís arbeiðir í gøtuni liðug. Ítøkiliga nevnir eigarafelagið:

1. Gera brandvegin á suðursíðuni av býlinginum, millum býlingin og kirkjugarðsleiðina lidnan. (asfaltera, kantar, gøtuljós) (tkr. 500).
2. Leggja slitlag á asfaltið (tkr. 1.750).
3. Fremja hóskandi vegamerking í økinum, serliga á parkeringsøkjunum (tkr. 50).
4. Hampa um skráar fram við gøtuni millum býlingin og brandvegin norðanfyri býlingin (tkr. 300).
5. Hampa um felagsøkið millum nr. 29 og 30. (tkr. 30)
6. Gera brandvegin norðanfyri býlingin lidnan. (tkr 250)
7. Seta upp spegl á vegamótum, har útsýnið ikki er nøktandi. (tkr. 25)

Samanlagt svarar hetta til arbeiðir fyri uml. kr. 2,8 mió.

Mett verður ikki, at øll hesi arbeiðir kunnu fremjast í 2023, men farast kann undir nøkur av arbeiðunum í 2023. Mett verður at ráðiligt er, at punkt nr. 1, 3 og 7 kunnu gerast í 2023. Samlaður kostnaður fyri hesi arbeiðir er mettur at verða upp til kr. 600.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 243 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Dagføring Myllutjørn | 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 600.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- kr. 600.000 verða játtaðar av konto 8175 Vegir (íløgur), LK81999 Vegaverkætlanir, á nýggja verkætlan "Dagføring av Myllutjørn" til at seta brandvegin í suðurendanum av Myllutjørn í dagførdan stand, dagføra vegamerking í býlinginum, og at seta upp spegl.
- málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 244 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 72/23 Áheitan um at gongubreytir verða gjørdar á Gríms Kambansgøtu, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 8/23 | 22/02439-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 80/23 | 22/02439-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 72/23 | 22/02439-7 |

**Upprunin til málið**
Borgari hevur vent sær til kommununa, um at fáa eina gongubreyt á Gríms Kambansgøtu.

**Lýsing av málinum**
Gríms Kambansgøta er einvegis oman móti Bøgøtu, og er dagmiðal ferðslan 1641. Vegurin verður eisini nógv brúktur av gangandi.

Tey gangandi føla seg ótrygg, tí tey ganga á koyribreytini, sum ikki er serliga breið.

Av tí at vegurin er einvegis, er pláss fyri einari gongubreyt, sum er 1,2 m, har hon er smalast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til loysn: Gr. Kb. g 22/02439-7.

Arbeiðið er mett at kosta 350.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02439-6 Gr. Kb. g - gongubreyt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 245<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Gongubreyt á Gríms Kambansgøtu | 350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 350.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja verkætlanina við kr. 350.000,00 av konto 8175, LK81999, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan “Gongubreyt á Gríms Kambansgøtu”
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

## 73/23 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 107/16 | 15/04352-4 |
| 13 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 428/16 | 15/04352-4 |
| 15 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 343/16 | 15/04352-4 |
| 16 Tekniska nevnd | 10.01.2017 | 5/17 | 15/04352-4 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 6/17 | 15/04352-4 |
| 18 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 9/17 | 15/04352-4 |
| 19 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 38/19 | 15/04352-4 |
| 20 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 48/19 | 15/04352-4 |
| 21 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 65/19 | 15/04352-4 |
| 22 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 25/20 | 15/04352-4 |
| 23 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 43/20 | 15/04352-4 |
| 24 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 10/23 | 15/04352-4 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 79/23 | 15/04352-4 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 73/23 | 15/04352-4 |

**Málslýsing**
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**
Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:
1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 $m^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**
Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot og kostnaðarmeting til vegagerð millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin ávikavist við og uttan 10 parkeringspláss (sí j. nr. 15/04352-24 og 26.).

Umboð fyri grannalagið kring Traðabrekku eru kunnað um uppskotið og í skrivi, dagf. 22. oktober 2016, sum er stílað til teknisku nevnd, siga umboðini seg taka undir við uppskotinum (sí j. nr. 15/04352-25).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum við 10 parkerings plássum, at arbeiðið verður sett í útboð millum innboðin, og innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera vegin og 10 parkeringspláss var boðið út til fýra arbeiðstakarar, trý tilboð komu inn og vóru tey hesi:

- P/F Articon kr. 1.232.307,- uttan MVG
- Sp/f Maskinkoyring kr. 1.464.545,- uttan MVG
- Sp/f R. J. Brockie kr. 1.072.958,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 1.737.271,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, trygging umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/04352-33).

Undanfarin játtan til arbeiðið er kr. 300.000,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 1.437.271,- fyri at takast kann av tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie uppá arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at gera sáttmála við Sp/f R. J. Brockie um arbeiðið, at játtaðar verða kr. 1.440.000,- afturat til arbeiðið, fíggjað av ætlaðum íløgum til vegir í 2017 og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Eftir at kunnað var um ætlaðu vegagerðina í skrivi dagf. 11. november 2016 til grannar við Láarvegin og Hoyvíksvegin og sum liggja uppat ætlaðu vegagerðini, vendir ein granni aftur tann 29. november 2016 við áheitan um innlit og umbøn um skotbrá til at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina.

Nevndi granni vendir síðani aftur við mótmælisskrivi, dagf. 8. desember 2016, (sí j. nr. 15/04352-39) og vísir m.a. á, at íbúgvar við Traðabrekku framanundan hava atkomu frá Traðavegnum og Láarvegnum og at tað koma at verða fýra vegir sum møtast millum húsini, har sýnið farmanundan er sera vánaligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin staðfestir samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 10. januar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at viðgera innkomin mótmæli.

**Ískoyti:**
Í í skrivi, dagf. 14. januar 2017, hava átta borgarar við Traðabrekku vent sær til kommununa at mótmæla ætlaðu vegagerðini, sum eftir teirra fatan ger umstøðurnar verri tá talan er um m.a. ferð og parkering og biðja samstundis um fund, at finna bestu loysnina.

Á fundi tann 3. februar 2017 høvdu umboð fyri nevndu borgarar høvið at greiða kommunalu fyrisitingini frá sínum sjónarmiðum og vístu m.a. á gøtusamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin sum betri loysn.

**Tilmæli:**
Við fyriliti fyri trygdini í hálku á Traðabrekku, mælir tekniski stjórin til, at nevndin gongur meirilutanum av teimum sum hava vent sær til kommununa á møti, við at staðfesta samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at umsitingin kannar hvussu nógv parkeringspláss kunnu skipast á økinum.

**Ískoyti:**

Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot til skipan av økinum til parkering, har tilkoyringin ávikavist er frá Hoyvíksvegnum og frá Traðabrekku.
Á økinum, sum er góðar 1000 fermetrar til víddar, er eftir hesum uppskotum í báðum førum pláss fyri 31 Parkeringsbásum (sí ávikavist j. nr. 15/04352-53 og j. nr. 15/04352-51).
P-plássið við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum hevur ráðgevi kommununnar kostnaðarmett til kr. 1.930.000,- uttan MVG, prosjektering, trygging, byggileiðslu, fakeftirlit v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at uppskotini um parkering verða latin grannalagnum til hoyringar.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skriv varð sent grannalagnum við Traðabrekku á 25 adressum, við umbøn um viðmerkingar til tey tvey uppskotini til skipan av økinum millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin til parkering uttan gjøgnumkoyring, men við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum ella í øðrum lagi frá Traðabrekku.

12 svarskriv, sum komu aftur, umboða ymisk sjónarmið og grundgevingar, men kunnu í høvuðsheitum bólkast nakað soleiðis:

1. Eingin ynskir P-pláss við innkoyring frá Traðabrekku og mótmælt verður staðiliga hesi loysn.
2. Flestu seta seg ikki ímóti, at P-pláss kemur við innkoyring frá Hoyvíksvegnum og nøkur viðmæla hesi loysn, men ynskja kunning áðrenn nakað verður sett í verk.
3. Fleiri ynskja, at P-plássið undir ongum umstøðum verður gjørt við gjøgnumkoyring.
4. Nøkur ynskja, at P-plássið verður gjørt við gjøgnumkoyring til Traðabrekku og at brekkan av trygdarávum verður stongd til blindveg.

Ad 1:
Mótmælið móti at P-pláss verður gjørt við innkoyring frá Traðabrekku verur grundgivið við tilvísing til at ferðslutrýstið á Traðabrekku vil økjast munandi til ampa fyri ferðslutrygdina í økinum. Millum tey sum mótmæla hesi loysn, eru umleið 50 íbúgvar við Láarvegin omanfyri, har tilkoyring er til Traðabrekku og hava hesi latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad 2:
Nøkur vísa á, at tørvur er á P-plássum í økinum og onkur sigur seg kunna nýta P-plássið, tá kavi er.

Ad 3:
Grannarnir á eystur síðuni á Traðabrekku 4-26 næst møguligum P-plássi, umboðandi 8 adressur, hava latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad4:
Víst verður til at grannalagið upprunaliga vendi sær til kommununa orsakað av vánaligu trygdini í bróttu brekkuni og at tey, tá kavi er, eru uttan vanligar tænastur so sum neyðsendarakfør, læknavitjan, renovatión og TAXA til t.d. læknaørindi v.m. og at eitt P-pláss á ongan hátt nøktar henda tørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at at parkeringspláss verður gjørt við atkomu frá Hoyvííksvegnum, at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina, at arbeiðið verður boðið út og at tilboðini verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at senda málið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

**Ískoyti:**

Málið hevur verið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

Megin niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini eru hesar (sí j. nr. 15/04352-83):
- P-plássið eigur at verða gjørt við gjøgnumkoyring frá Hoyvíksvegnum til Traðabrekku.
- Traðabrekka eigur av trygdarávum at verða gjørd til blindveg, móti ávikavist Láarvegnum og Traðarvegnum.
- At gøta, sum skilur gangandi frá bilferðluni, eigur at verða gjørd framvið P-plássinum.
- At vegamótið millum P-plássið og Hovíksvegin eigur at verða flutt nakað norðureftir fyri at fáa frástøðu til vegamótið Stoffalág – Hoyvíksvegur.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot frá ráðgeva, sum er í samsvar við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini. Eftir hesum uppskoti verða 23 P-pláss á økinum (sí j. nr. 15/04352-84).

Skitsuuppskotið hevur við sær, at umleið 52 fermetrar av lendi mugu útvegast burturav grannamatriklinum 727c norðan fyri P-økið og hevur ánarin av nevnda matrikli, sagt seg sinnaðan at selja lendið til kommununa eftir nærri avtalu.

Sunnan fyri ætlaða P-økið hevur ánarin av grannamatriklinum 726h ynski um marknaumskipan móti P-økinum, soleiðis at P-økið verður nakað longur burturfrá sethúsum hansara. Skitsuuppskotið til P-økið hevur fyrilit fyri hesi marknaumskipan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti, sum er í samsvari við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini og at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina.
2. At umsitingin tekur stig til at fáa í lag tillaging av matrikulmarki samsvarandi skitsuuppskotinum.
3. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt taka undir við tilmælinum, tó so at eingin gjøgnumkoyring verður til Traðabrekku frá parkeringsplássinum.

**Ískoyti:**
Ánarin av grannamatriklinum nr. 726h sunnan fyri ætlaða P-økið hevur fráfallið ynski sínum um marknaumskipan móti P-økinum.

Ánarin av grannamatriklinum nr. 727c, norðan fyri P-plássið, sigur seg sinnaðan at lata lendi til innkoyringina frá Hoyvíksvegnum, men ikki fyri pening.
Ístaðin er ynski hansara, at kommunan steinsetur tann partin av hansara grundøki, sum er vátlendi og mold verður løgd á steinsetingina, soleiðis at grundøkið hansara hereftir verður væl drenað og vætan burturbeind.
Um ynski um steinseting og drening av grannastykkinum skal gangast á møti, er neyðugt at gera verkætlan við forkanningum og virðismeting v.m., sum skal góðtakast av pørtunum.
Um ætlanin, at gera innkoyringina til P-økið yvir grannamatrikulin 727c, verður slept og uppskotið um P-plássið verður umskipað, soleiðis at innkoyringin frá Hoyvíksvegnum ístaðin verður gjørd yvir kommunalt lendi, gerst málið um P-plássið munandi einfaldari og helst eisini bíligari at fáa í lag.

Ráðgevi kommununnar hevur á skitsuuppskoti lýst hvussu P-plássið kann skipast við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi og 31 P-plássum (sí j. nr. 15/04352-91).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi (sí j. nr. 15/04352-91 P-pláss uttan gjøgnumkoyring).

2. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Borgarar í og við Traðabrekku hava víst á viðurskifti við skitsuuppskotinum (sí. Jnr. 15/04352-91 (P-pláss uttan gjøgnumkoyring)), sum ikki eru samsvarandi við tey ynskir, sum borgararnir upprunaliga ynsktu fyri gøtuna.

Í januar 2023 hava borgararnir í gøtuni latið umsitingini undirskriftir, har víst verður á, at ynski enn er um at gera ábøtur á ferðsluligu viðurskiftini í gøtuni.

Á borgarafundi 31.01.2023, har býarverkfrøðingurin og formaðurin í teknisku nevnd eisini luttóku, vóru sjónarmiðini hjá borgarunum í gøtuni løgd fram. Samanumtikið varð víst á, at borgararnir í gøtuni ynskja, at:

1. Trygdin fyri bilaferðsluna verður raðfest, soleiðis at koyrandi verður beinleiðis í Hoyvíksvegin.
2. Trygdin fyri gangandi verður raðfest soleiðis at:
   a. Trygg gonguleið verður millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin
   b. Trygg gonguleið verður gjørd millum Láarveg og Traðaveg við hóskandi gongubreyt og rekkverki.
3. Avvatningin á brekkuni millum Lágarveg og Traðaveg verður dagførd, soleiðis at hálka í størri mun verður fyribyrgd.

**Skjøl**
15/04352-100 traðarbrekka-hoyvíksvegur 2-0

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Dagføring av Traðabrekku | 1.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.800.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til, at:
- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við ráðgeva um prosjektering, og við arbeiðstakara um fremjan av hesum arbeiðum innan ein karm á tilsamans kr. 1.800.000.

- hetta verður fíggjað á nýggja verkætlan, Dagføring av Traðabrekku, av konto 8175 Vegir (íløgur) LK 81999 Vegaverkætlanir.
  málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið av skrá.

## 74/23 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 265/20 | 18/00992-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 236/20 | 18/00992-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 9/21 | 18/00992-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 23/21 | 18/00992-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 56/21 | 18/00992-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 65/21 | 18/00992-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 91/21 | 18/00992-1 |
| 19 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 121/21 | 18/00992-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 21/22 | 18/00992-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 38/22 | 18/00992-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 31/22 | 18/00992-1 |
| 23 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 60/22 | 18/00992-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 43/23 | 18/00992-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 74/23 | 18/00992-1 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 74/23 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---:|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna
18/00992-51 Gøtur at gera í 2022

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá
Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

**Mettur kostnaður var sostatt:**

| | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

**Status:**

| | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |

| | |
|---|---|
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Viðvíkjandi lendi burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, sum er privatogn.  Sí kortskjal 18/00992 - 33

Kommunan hevur í samráð við eigaran gjørt gøtu framvið ánni, inni á matr. nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, og hevur í hesum sambandi flutt hegnið niðan um gøtuna. ( Sí kortskjal 18/00992 – 33 )

Neyðugt verður at keypa uml. 270m2, av lendi til gøtuna, frá verandi eigara.

Talan er um D1 øki í byggisamtyktini. Fermeturprísur sambært yvirliti hjá Búnaðarstovuni  fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri er 137kr. pr. m2.  Samlaður keypsprísur verður uml. 37.000,- kr. og skal kommunan harumframt rinda rinda allar allar útreiðslur til matrikulering. Mettur kostnaður kr. 4.000,-

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa neyðugt lendið uml. 270 fermetrar, burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, til gøtuna fyri 37.000,00 kr. og at rinda útreiðslur til matrikulering uml. 4.000,00 kr.

Konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta 4 gøtustrekkir í árinum 2021. Talan er um gøturnar:
1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand

Ad. 1 – Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-38. Ynskiligt er at gøtan framvið Sandá heldur áfram víðari út í dalin sambært kortskjalinum. Í fyrsta umfari skal gøtan leggjast í lendi, soleiðis at hon í minst møguligan mun ávirkar náttúruna og djóralívið á staðnum. Kommunan varðar av stórum parti av lendinum, men eru eisini traðir, sum eru privat ogn og verður tí neyðugt at fara í samráðingar við hesar eigarar um hvussu gøtan gongur framvið teirra ogn. Talan er um eina tilgongd, sum kann draga út, alt eftir hvussu samráðingarnar ganga, men kann eisini hugsast, at fólk hava sæð virknaðin og stóru gleðina hjá borgarum fyri verandi gøtur framvið Sandá.
Tá gøtan er staðsett, kann arbeiðið bjóðast út og verður tá komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 2 – Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna, sí j.nr. 18/00992-39. Hendan gøtan varð raðfest í 2020, men vísti tað seg, at tilboðið upp á gøtuna var so høgt, at kommunan vrakaði tilboðið. Ætlanin er at bjóða gøtuna út av nýggjum og verður síðani komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 3 – Framhald av gøtuni Frammi í Dal í Kollafirði, sí j.nr. 18/00992-40. Gøturnar í Kollafirði verða gjørdar av sjálvboðnum initiativi, sum merkir, at fólk á staðnum standa fyri gøtugerðini, meðan kommunan fíggjar tilfarið til gøtugerðina. Í 2021 væntast at brúka 300.000 kr. til framhald av verandi gøtum.

Ad. 4 – Gøta út á Hvítasand, sí j. nr. 18/00992-41. Sambært Frílendisætlanini fyri Hoydalar er ynskiligt, at gøta verður gjørd út á Hvítasand. Gøtan skal leggjast væl í lendið og síðani bjóðast út til arbeiðstakarar at gera. Tá eitt tilboð fyriliggur fyri gerð av gøtuni, verður komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1, 2 og 4, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 300.000 av L00001, Løgukarmur fyri árið til L62019, Lendisgøtur, til framhald av gøtu nr. 4, Frammi í Dal í Kollafirði.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gøturnar, ið eftir ætlan skulu raðfestast í ár (2021) verða gjøgnumgingnar niðanfyri í mun til kostnað o.a.. Ein eyka gøta er løgd afturat raðfestingarlistanum: gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali.

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand
5. Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali

<u>Ad 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí skjal 18/00992-38</u>
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað. Ástaðarfundur var á gøtuni t. 19. mars, har greitt var frá arbeiðinum. Samlaða gøtulongdin, sum skal gerast, er áleið 1910 m, og er arbeiðið á gøtuni deilast sundur í trý strekki.
Níggju veitarar við viðkomandi arbeiðsroyndum vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava fýra av hesum bjóðað uppá arbeiðið. Innkomnu tilboðsupphæddirnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 2.144,459,16 kr. |
| Veitari 2: | 3.145.070,00 kr |
| Veitari 3: | 4.373.882,00 kr |
| Veitari 4: | 6.016.500,00 kr |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at umsitingin fer undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið. Harumframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú frá traðaeigarum og náttúrufriðingar myndugleikanum, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd..

Kostnaður í alt: 2.273.127 kr. v/mvg

Av tí at gøtan gongur gjøgnum nógvar privatar traðir, so verður mett neyðugt við 200.000 kr. til óvæntaðar útreiðslur.

<u>Ad. 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna</u> sí j.nr. 18/00992-39. Gøtan er koyrd í útboð, og ástaðarfundur var á gøtuni 25. mars. Freistin hjá veitarum at senda tilboð inn er 12 apríl. Arbeiðið fevnir um at gera eina lendisgøtu við trappu. Samlaða longdin á gøtuni er 110 m.

Mettur kostnaður fyri arbeiðið er áleið 600.000 kr.

<u>Ad. 3: Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður, sí j.nr. 18/00992-40</u>.
Umsitingin hevur sent eitt svarskriv um játtan á kr. 300.000, samtykt í býráðnum 25. februar, til lokalu borgararnar, sum standa fyri arbeiðinum á hesi gøtuni.
Hetta arbeiðið verður framt í ár sambært avtalu.

<u>Ad. 4: Gøta frá Boðanesið út á Hvítasand sí j. nr. 18/00992-41</u>
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað, og hevur ástaðarfundur verið á gøtuni 19. mars. Samlaða longdin á gøtuni er umleið 250 m.

Somu veitarar, sum til gøtu 1, vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava 7 bjóða uppá arbeiðið:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 172.500 kr. |
| Veitari 2: | 181.427 kr. |
| Veitari 3: | 275.000 kr. |
| Veitari 4: | 311.250 kr. |
| Veitari 5: | 349.750 kr. |
| Veitari 6: | 402.250 kr. |
| Veitari 7: | 404.417 kr. |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at fara undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið, umframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú yvirfriðingarmyndugleikanum.

Kostnaður íalt við MVG er 200.000 kr.

<u>Ad.5 - Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-045</u>
Afturat omanfyri nevndu gøtum er uppskot til gerð av gøtu kring vatnbrunnin í Havnardali (sí hjálagda kort). Uppskotið kann síggjast sum partur av frílendisætlanini fyri Havnardal, har endamálið er at skipa og varðveita økið sum frítíðarøki til almenningin.

Samlaða longdin av gøtuni er áleið 1260 m, og gongur gøtan gjøgnum landsjørð umframt kommunalt lendi. Neyðugt verður at fáa loyvir frá avvarðandi festarum, soleiðis at gøtan kann ganga gjøgnum teirra lendir.

Ætlanin er at bjóða gøtuna út til royndar veitarar. Tá tilboð fyriliggur, verður tað lagt aftur í nevnd til kunningar. Fyri at seta fyrireikingar/arbeiðið í gongd verður mælt til at játta 1.000.000 kr. til gøtuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir at fáa neyðugu avtalur og loyvi frá viðkomandi pørtum til gerð av nevndu gøtu 1, 2, 4 og 5.
- at játta í alt kr. 4,3 mió. kr. av konto 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6275, L62019 Lendisgøtur, til gerð av niðanfyri nevndu gøtum:

| Gøta – heiti: | Kostnaður: |
|---|---|
| Gøta 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali: | 2.473.127 kr. |

| | |
|---|---|
| Gøta 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna | 600.000 kr. |
| Gøta 4 – Gøta út á Hvítasand | 200.000 kr. |
| Gøta 5 – Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali | 1.000.000 kr. |

- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta fylgjandi gøtustrekkir í árinum 2022.

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Sí journal nr. 18/00992-51

Stórur tørvur er á at viðlíkahalda verandi gøtukervi í kommununi og tí er ynskiligt at partur av játtanini til gøturnar fer til hetta í 2022.

Ad. 1 – Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
Ein gøta á áleið 400 metrar, sum samanbindur Sanatoriivegin við Hoyvíksvegin. Henda gøtan er í Boðanesætlanini nevnd sum høvuðsgøta í frílendinum og kemur at geva møguleika fyri enn betur túrum í økinum. Gøtan liggur á landsjørð og má tí gerast í samráð við Umhvørvisstovuna, sum umsitur lendið.
Á fløtuni í Hoydølum varð fyrsti fótbóltsvøllur í Havn og ynski er um at vísa á hetta søguliga stað á leiðini. Ætlanin er at gera hetta við eini minnisplátu við mynd av fyrsta fótbóltsdystinum millum HB og TB, sum var 18. juli 1909.

Ad. 2 – Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
Nógv ymisk gøtustrekki eru gjørd í Sortudíki, Gundadali og á Ternuryggi, men summi gøtustrekki mangla og tí er ikki møguligt at ganga allan vegin frá Ternuryggi og oman til Gundadal ella yvir til Svartafoss gjøgnum tað grøna lendið. Við at gera hesi gøtustrekkini, verða verandi gøtur samanbundnar. Talan er um ymisk gøtustrekki á áleið 590 metrar tilsamans.

Ad. 3 Gøta í Viðarlundini í Gundadali
Verandi gøtukervi í Viðarlundini í Gundadali er væl útbygt við nógvum góðum gøtum og hesar verða eisini nógv brúktar av borgarunum úr øllum býnum.
Við verandi gøtukervi er tó ikki møguligt at ganga ein langan rundtúr inni í viðarlundini.
Við at gera eitt 200 metrar gøtustrekki, kann verandi gøtukervi knýtast saman og møguligt verður at ganga ein langan samanhangandi túr inni í Viðarlundini.
Arbeiðið við gøtuni skal gerast í samráð við Skógrøktina.

Ad. 4 – Gøta oman á Sandagerði Argjamegin

Ynskiligt er at skapa betur samband oman á Sandagerð við at gera eina atkomu oman á sandin argjamegin. Talan er um eina gøtu, sum gongur frá Rættargøtu, gjøgnum stykkið, sum tilhoyrir festinum í Sandagerði og oman á sandin. Loyvi krevst frá umsitarunum av festinum í Sandagerði og frá fríðingarmyndugleikunum at fara í holt við hesa gøtu.

<u>Ad. 5 Gøta niðan á Hoyvíksvøll</u>
Eigarafelagið Jørundar- og Torkilsgøta eftirspyr, at sambandið niðan á Hoyvíksvøll verður betur. Ymiskir møguleikar eru fyri hvussu hetta sambandið kann betrast, og umsitingin ynskir at fara í samskifti við eigarafelagið um at fáa gjørt eina góða gøtu millum Jørundargøtu og Hoyvíksvøll.

<u>Ad. 6 Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali</u>
Fyrireikingar til gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali eru farnar í gongd í 2021 og arbeitt verður víðari við hesi ætlan í 2022.

<u>Ad. 7 Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði</u>
Gøtan er komin væl áleiðis og verður liðug í vár, og nøkur fylgiarbeiði, onkur átrokandi, eiga at verða gjørd sum avleiðing av gøtuni, ið er gjørd.
Tilfar sum lá í grótbrotinum á Boðanesi varð brúkt til gøtuna, soleiðis at bergið nú er fríttlagt. Neyðugt er at skróta bergveggin, fyri at leyst grót ikki ríður oman. Gøtan frá høvuðsvegnum og oman treingir til at verða sett í stand, jaðarin framvið hampaður og veitin reinsað, soleiðis at vatn verður hildið frá gøtuni.
Ein fløta er nú við økið, har gøtan á Hvítasand byrjar, har gamla grótrúgvan er ruddað og koyrd burtur. Ynskiligt er, at leggja skorið grót frá gamla grótídnaðinum á hesa fløtuna, til borð/stólar at fríðka um og skipa økið til uppihald.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1-5, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av L62019 til viðlíkahald av gøtukervinum í kommununi og verða fluttar á konto 6212
- At játtaðar verða 150.000,- kr. av L62019 til gøtu 7, og verða fluttar á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking viðvíkjandi teimum 150.000 kr., at hesar verða fluttar av LK62019 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir – tí talan lutvíst er um eykajáttan.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Borgarstjórin mælti býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at tær 150.000 kr. verða fluttar av LK62997 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin.

Atkvøtt varð um málið við fyrstu viðgerð, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johanesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í 2022 varð samtykt at fara undir hesar gøtur:
1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Fleiri av gøtunum vórðu ikki settar í gongd síðsta ár, grundað á manglandi starvsfólkatilfeingi. Støðan er tó tann, at:
- Gøtan niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu er vorðin gjørd, og var kostnaðurin fyri hesa áljóðandi kr. 80.000 íroknað mvg.
- Gøtan á Hvítasand varð gjørd liðug og avhendað.
- Grundað á, at tað er heldur torført at fara undir gøtuna kring vatnbrunnin í Havnadali, so verður bíðað við at seta hesa gøtuna á breddan í 2023.
- Gøtan framvið Sandá er í gerð, og eru nakrar avbjóðingar við at fáa hana lagda framvið nøkrum privatum matriklum. Arbeitt verður við hesum avbjóðingum, og verður gøtan eftir ætlan handað kommununi seint í 2023.

Tvær gøtur eru tó komnar afturat áður samtyktu gøtum. Hesar eru gøta niðan á Ingibjargargøtu frá Torkilsgøtu og gøta í økinum við Stórutjørn.

Sostatt verða gøturnar, sum ætlanin er at raðfesta í 2023 hesar, sí viðhefta dagførda skjal j. nr. 18/00992-58, Lendisgøtur 2023.:
1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Ingibjargargøtu frá Torkilsgøtu
6. Gøta í økinum við Stórutjørn

Játtanin til Lendisgøtur varð í 2022 brúkt til fleiri aðrar verkætlanir. Hesar vóru:
- Havnará (1 mió kr)
- Menning av Vágsbotni (1 mió kr)
- Viðlíkahald av gøtukervinum, konto 6212 (1 mió kr)

Grundað á, at omanfyri nevndu verkætlanir nýttu samtyktu játtanina, sum upprunaliga varð játtað til gerð av eitt nú gøtuni framvið Sandá, so er L62997, Lendisgøtur, nú í einum halli, sum neyðugt verður at fíggja innaftur av løgukarminum.

Á løgukarminum fyri Lendisgøtur eru settar av 4 mió kr. Henda játtanin kemur í fyrsta lagi at fíggja omanfyri nevnda hall, og at tryggja kostnaðin av gøtuni framvið Sandá, fyri síðani at fíggja gerð av gøtunum, sum ætlanin er at fara undir at fremja í 2023.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62997 | Lendisgøtur | 6275 | L62997 | Lendisgøtur | | 4.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta 4 mió kr. av LK62997, Lendisgøtur, til L62997, Lendisgøtur.
- at heimila umsitingini at fara undir at fyrireika, bjóða arbeiðini út og seta arbeiðini av lendisgøtunum 1-6 í gongd.
  at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023: Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Elsu Berg:**

Tikið verður undir við málinum við teirri broyting, at bíðað verður við at byggja lendisgøtuna í Hoydølum í tvey ár.

Bryotingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdótir Iversen og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 265 |
| | Formansins merki: |

# 75/23 Tórsvøllur Torg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 249/20 | 21/03047-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 308/20 | 21/03047-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 66/21 | 21/03047-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 27/21 | 21/03047-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 94/21 | 21/03047-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 88/21 | 21/03047-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 119/21 | 21/03047-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 20/23 | 21/03047-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 48/23 | 21/03047-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 73/23 | 21/03047-1 |
| 13 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 75/23 | 21/03047-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórsvøllur sum altjóða stadion.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2010 settu Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya seg fyri at fáa Tórsvøll góðkendan sum altjóða leikvøll. Verkætlanarstigini hesi ár hava verið:

- Masterplan fyri Tórsvøll 2010-2011
- Ljósanlegg sett upp 2011
- Grasvøllur skiftur við graslíkisvøll 2012
- Suðurtribuna tikin niður, nýtt FSF høvuðssæti og áskoðarapláss undir tak, eysturskýli undir tak 2013-15
- Vesturskýli við umklæðingarrúmum, teknisku hølum, áskoðarapláss undir tak v.m. 2016-21

Síðsta verkætlanarstigið í teirri ætlan, sum løgd varð upprunaliga, og sum eisini er partur av kravdum umstøðum til altjóða stadion, er torgið uttanfyri sjálvt stadion. Talan er um alt økið frammanfyri FSF høvuðssætið og Niðara vølli frá økinum millum Dansifrøi og Gundadalshøllina og framvið Gundadalsvegnum til og við Brigdehúsið.

Torgið fevnir um røð av funktionalitetum, sum hava við altjóða dystarstøðu at gera. Torgið skal harumframt liva upp til býarskipanarlig krøv samsvarandi heildarætlanini fyri Gundadal, har hetta økið er høvuðsportalur til Gundadal frá miðbýnum.
Yvirskipað er torgið skipað sum eitt uppihaldstorg við spæliplássi til allar aldursbólkar umframt parkering, vegir og gøtur. Tá landsdystir eru, verður torgið umskipað, so tað kann møta øllum krøvum, sum UEFA setur til kategori 4 stadion.

Torgið fevnir um:
- Skipað atkomu til áskoðarar, liðbussar, catering, neyðsendarakfør v.m.
- 1.000 m2 P-øki til sjónvarpsvognar, sum ásett fyri kategori 4 stadion, men sum í dagligdegnum antin kann brúkast til “street ítrótt” , ella parkering (33 stk.), tá dystir eru í Gundadali
- Farleið hjá gongufólki og súkklandi gjøgnum Gundadal sum lýst í “Heildarætlanini fyri Gundadal”
- Uppihaldstrappa frammanfyri FSF høvuðssætinum og Kafé #12

- Nýtt urbant spæliplláss til allar aldursbólkar
- P-øki við Gundadalshøllina til 72 bilar
- Planting fram við Gundadalsvegnum og á torginum
- Allur belegningur á økinum (asfalt, betong og flísar)
- Innbygt "uttara hegn" og "turnstiles"[1]
- Info- og atgongumerkja kiosk
- Goymsla til "turnstiles"[1]
- Ljósseting sum lýst í "Heildarætlanini fyri Gundadal"
- Av- og áseting til torgið
- Busslummar til býbussar
- Benkur og annað býarinventar
- Spæliplássútgerð

[1)] "Turnstiles" er teljingartól til áskoðarar

Barakkirnar framvið Gundadalsvegnum, sum eru fýra samanbygdar bygningar, skulu takast niður. Kommunan eigur tveir av bygningunum, hinir standa á leigaðum lendi hjá kommununi. Tilgongd at yvirtaka báðar bygningarnar, sum ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgini eiga, er í gongd.

Harumframt verður Gundadalshøllin eftir ætlan yvirtikin, har kommunan eftir hetta hevur fult ræðið á økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi, sum ætlað er til P-øki.

Arbeiðið verður eftir ætlan gjørt í stigum, so hvørt økið verður tøkt. Fyrsta stig er at byggja saman stadion og torg við uppihaldstrappuni og farleið frá Gundadalsvegnum til stadion. Trappan er eisini liður í at javna hæddarmun.

Ætlanin er at skipa verkætlanina sum samstarv millum kommununa og FSF eftir sama leisti sum undanfarnu byggistig. Uppskot til samstarvsavtalu er gjørt. Sambært uppskotinum hevur samlaða verkætlanin eitt útreiðslukarm uppá kr. 30 mió, og at kommunan rindar 65% og FSF 35%. Arbeiðið er sett at byrja í 2021 og enda í 2023.

Í samstarvsavtaluni er eisini ásett, at niðurtøka av barakkunum er partur av verkætlanarkostnaðinum, men at kommunan serskilt ber kostnaðin at yvirtaka ognirnar hjá ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgunum.

Í íløguætlanini eru kr. 5 mió settar av til endamálið 2021. Íløgujáttan fyri alla byggingina verður at játta árini 2022 og 2023.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Samráðing um yvirtøku av bygningum er í sjálvstøðugum málum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 267<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um íløguverkætlan í samstarvi millum kommununa og FSF eisini um fíggjarliga kostnaðin. Loft er lagt á kostnaðin. Umsitingin og FSF eru í gongd við at skipa felags avtalu um rakstur og viðlíkahald av øllum Tórsvølli, harímillum eisini torginum.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 19.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021-2023 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 5775 | Nýggj projektkonta | | 5775 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L0001 løgukarmur í 2021 til nýggja projektkontu Tórsvøllur torg. Harumframt verður mælt til at játta kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2022 og kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2023.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Ískoyti:**
Talan er um verkætlan skipað sum eitt samstarv millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu, og skal uttanum økið til stadion til tíðir fevna um dystarstøður, men meginpartin av árinum er talan um alment øki, sum skal virka í gerandisdegnum.

Økið er áleið 7000-8000 $m^2$ til støddar, og eru greið altjóða krøv til dystarstøður, sum skulu samantvinnast við býarskipanarlig viðurskifti. Skitsuuppskotið tekur atlit til altjóða krøvini, og eru býarskipanarligu viðurskiftini partvís lýst í uppskotinum og í skjalinum *Viðmerkingar til spælipláss.*

Ein tørvslýsing hevði verið fyrsta stigið í eini skilagóðari tilgongd, har umsitingin beinanvegin varð tikin við uppá ráð. Vantandi tørvslýsingin hevði verið við til at tryggja ein samanhang millum tørv, krøv og ynskir til nýggja økið, umframt at verkætlanin varð sett inn í eina yvirskipaða hugsan í tráð við heildarætlanina fyri Gundadal og ítøkiligu verkætlanina um vestara skýlið á Tórsvølli.

Talan er um eitt stórt býartorg í Havnini, og tí er hóskandi at vera framsíggin í mun til, hvørji ynskir og krøv verða sett til verkætlanina. Verkætlanin verður mett at kosta 19 mió. kr., sum er eitt boð frá ráðgeva. Upphæddin er ikki grundað á eina kostnaðarmeting við støði í eini tørvslýsing, tí taka nógv ivamál seg upp í mun til verkætlanina. Mælt verður tí til at arbeiða víðari við at nágreinað verkætlanina við eini tørvslýsing í eini neyðugari tilgongd, sum skal vera grundarlagið undir verkætlanini. Hetta seinasta kundi verið skilmarkað í samstarvsavtaluna undir *Útinnan av arbeiðinum grein 4,* har tað stendur: *"...byggingin av torgi v.m. verður bygt eftir prosjekti, uppsett av MAP arkitektum"*.

**Skjøl:**
*Viðmerkingar til spælipláss*, journal nr. 20/04581-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya treytað av, at verkætlanin verður nágreinað í neyðugari tilgongd og ráðgevarasáttmáli verður gjørdur við ráðgeva og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Borgi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskrá er evnað til verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali. Byggiskráin er býtt í seks partar við yvirskriftunum:

- 1.0 Inngangur
- 2.0 Fortreytir
- 3.0 Krøv og ynski til byggimálið
- 4.0 Krøv og ynski til býarbúnaðin
- 5.0 Tøkni og veitingar
- 6.0 Skipan av verkætlan

Ynskið er at skapa eitt ítrótta- og trivnaðarpláss í Gundadali, sum bæði lýkur altjóða krøv til virksemið hjá Fótbóltssambandi Føroya (FSF), eins og økið gerst eitt virkið býarrúm. Pláss skal vera til spæl og uppihald, ið vendir sær til øll uttan mun til aldur ella tilknýti til eitt av mongu ítróttafeløgunum í økinum. Yvirskipað verður býartorgið býtt í 6 høvuðsfunktiónir, og skal býartorgið rúma:

- einum túni til eina størri fólkamongd, umleið 1500-2000 fólk.
- einum 1000 $m^2$ stórum parkeringsøki til sjónvarpsvognar.
- einari uppihaldstrappu.

einum spæliøki til allar aldursbólkar.
- einari min. 500 $m^2$ stórari skoytubreyt.
- 150 parkeringsplássum til VIP og vitjandi.

Byggiskráin leggur upp til, at uppgávan at skipa býartorgið í Gundadali fevnir um at finna fram til bestu loysnina at skipa nýtt býartorg á økinum, umframt at finna fram til bestu loysnina at sameina góða býarplanlegging og byggilist við altjóða krøv til virksemið hjá FSF, soleiðis at Tórsvøllur endaliga kann gerast tjóðarleikvøllur føroyinga. Talan er sostatt um eina skipan á økinum, sum leggur upp fyri verandi virksemi bæði byggilistarliga og byggitøkniliga, umframt at býartorgið hevur til endamáls at víðka karmarnar, sum lúka altjóða krøv og nútímans býarumstøður. Sí nágreinað krøv til býartorgið í byggiskránni.

**Skjøl:**
Byggiskráin Býartorgið í Gundadali, journal nr. 20/04581-11

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at samtykkja byggiskránna fyri verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali, at heimila umsitingini at gera ráðgevarasáttmála við MAP Arkitektar og at beina málið í býráðið umvegis, teknisku nevnd, mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfnn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð av verkætlanini Tórsvøllur Torg hevur verkætlanin ligið still. Ynskiligt er, at verkætlanin verður tikin uppaftur, soleiðis at økið verður fríðkað og at umstøðurnar til Tórsvøll verða raðfestar.

Byggiskráin er skrivað og samtykt, og ynskiligt er nú at fáa gjørt eitt skipanaruppskot av økinum út frá byggiskránni. Og eftirfylgjandi, tá skipanin av økinum er liðug, so er ætlanin at fara undir at prosjektera, bjóða verkætlanina út og seta arbeiðið at fremja torgið í gongd.

Upprunaliga vórðu kr. 5 mió. játtaðar til L57035, Tórsvøllur Torg. Írestandi upphædd er áljóðandi kr. 3.591.000, sum er ynskilig at savna á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275.
Á íløgukarminum LK62055, Torg framman fyri FSF, eru settar av kr. 2 mió. til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57035 | Tórsvøllur Torg | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 3.591.000 |
| 6275 | LK62055 | Torg frammanfyri FSF | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 5.591.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir skipan av økinum, prosjektering, útbjóðing av verkætlanini, og at seta arbeiðið í verk.
- at írestandi upphædd á kr. 3.591.000 á L57035, Tórsvøllur Torg, verður flutt á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at játta kr. 2 mió. av LK62055, Torg frammanfyri FSF, á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtykt omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við samtyktini í byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at írestandi upphæddin, ið skal flytast av konto 5775 L57035 yvir á nýggja projektkonto undir konto 6275 er kr. 2.975.688.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 76/23 Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 64/21 | 21/01366-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 90/21 | 21/01366-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 122/21 | 21/01366-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 144/21 | 21/01366-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 215/21 | 21/01366-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 223/21 | 21/01366-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 108/22 | 21/01366-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 132/22 | 21/01366-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 125/22 | 21/01366-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 44/23 | 21/01366-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 77/23 | 21/01366-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 76/23 | 21/01366-1 |

**Upprunin til málið**
Hoyvíkar kirkja umframt borgarar í Hoyvík hava í fleiri umførum víst á ynski um at fáa betra um kirkjugarðsleiðina, soleiðis at líkbilurin við fylginum kann fara umvegis Dalin Langa niðan í kirkjugarðin.

**Lýsing av málinum**
Hoyvíkar kirkja varð bygd í 2007, og liggur sunnan fyri miðstaðargøtuna Karlamagnusarbreyt. Kirkjugarðurin er staðsettur norðan fyri Klingruna.

Í dag koyrir líkbilurin eftir Løgmannabreyt, tá líkfylgið fer seinastu ferðina úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin. Hetta verður ikki mett sum ein serliga virðilig leið, umframt at leiðin tykist rættiliga long.

Enn eru ikki nógvar gravir í brúk í kirkjugarðinum, men ynskiligt hevur verið, at seinasta leiðin úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin verður betra og gjørd meiri virðilig.

Heildarætlanin fyri Karlamagnusarbreyt vísir á, at kirkjutorgið, sum er norðan fyri kirkjuna og gongur yvir til skúlan eystaneftir og parkeringsøkið vestaneftir skal gerast til eitt kirkjutorg, sum kann brúkast av borgarum í Hoyvík til hátíðarhald, umframt at skúlin kann brúka økið í gerandisdegnum. Torgið skal somuleiðis gerast við eini av- og á skipan, soleiðis at møguligt verður at seta fólk og børn trygt av, tá tey antin skulu í skúla ella kirkju. Harumframt vísir heildarætlanin á eina leið frá hesum torginum yvir til verandi gøtu í Dalinum Langa, sum síðani skal bindast í kirkjugarðin, soleiðis at líkfylgið kann fara beina leið niðan í kirkjugarðin umvegis Dalin Langa.

Loysn skal finnast á, hvussu leiðin kann gerast í økinum millum Hoyvíkar skúla og bústaðarøkið Myllutjørn, umframt at ein loysn má finnast á, hvussu leiðin fer tvørtur um Klingruna. Harumframt skal gøtan betrast, soleiðis at líkbilurin kann koyra á gøtuni.

Tað er ikki ætlanin, at aðrir bilar enn líkbilurin skulu kunna koyra hesa leiðina, so neyðugt verður við eini forðing í báðum endunum á leiðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
A3 í 3. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

D1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska deild upplýsir, at neyðugt verður at taka hædd fyri áarløki, sum gongur frá Mylnutjørn oman í ítróttar/skúlaøkið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Kirkjugarðsleiðin_yvirlitstekning_j. nr. 21/01366-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at skipa kirkjugarðsleiðina frá kirkjutorginum niðan í kirkjugarðin,
- at umsitingin setir arbeiðið í gongd,
- at játta 250.000 kr. av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja íløgu “Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík” á konto 6275, Fríðkan av býnum, at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Kirkjugarðsleiðin varð grundað á skipanaruppskot boðin út til 2 veitarar, og komu 2 tilboð inn.
Maskingkoyring við Karl Paturson bjóðaði 1.358.040,00
Sp/f Berghestar bjóðaði 1.255.332,29

Útboðið varð skipað í 3 høvuðspunkt umframt byggipláss.

0. Byggipláss
1. Nýggj og tillagað gøta millum kirkjuna og parkeringsøkið við Hoyvíkar skúla
2. Nýggj gøta millum verandi gøtu til Klingruna við innkoyring til kirkjugarðin
3. Breiðkan og umvæling av verandi gøtu millum nýggja gøtu 1 við Hoyvíkar skúla og nýggja gøtu 2 við kirkjugarðin

Til ber at seta arbeiðið í verk grundað á játtanina á 250.000,-, men játtanin røkkur einans til partvís at seta pkt. 3 í gongd.
Av tí at verkætlanin varð boðin út grundað á yvirskipað skipanaruppskot, eru størri sannlíkindi fyri at eykaarbeiði verða.
Neyðugt er við meirjáttan fyri at seta samlaðu verkætlanina í verk.

**Skjøl:**
21/01366-8 kirkjugarðsleiðin útbjóðing 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at

- Játta kr. 1.250.000 á konto 6275, L62047, Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík, fíggjað við at játta kr. 950.000 av LK62046, Løgukarmur fyri fríðkan av býnum og kr. 300.000 av LK62035, Løgukarmur fyri vetrarfriðing.
  og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera kirkjugarðsleiðina fór í gongd í november 2021.

Kirkjugarðsleiðin er býtt í 3 petti.

1. Nýggj og tillagað gøta millum kirkjuna og parkeringsøkið við Hoyvíkar skúla –
   a. Skúlin mótmælti farleiðini, tí at hon lá ov tætt uppat skúlanum og ynsktu tey at gøtan verður løgd longri uppi í skráanum í størri fjarstøðu frá skúlanum.
   b. Eigarafelagið við Myllutjørn óttaðist, at kirkjugarðsleiðin verður brúkt til vanliga ferðslu og mótmælti hesum. Tey ynsktu eisini, at ein skreiðibakki verður gjørdur í økinum frá Myllutjørn til parkeringsplássið við Hoyvíkshøllina
2. Nýggj gøta millum verandi gøtu til Klingruna við innkoyring til kirkjugarðin –
   a. er komin væl áleiðis
3. Breiðkan og umvæling av verandi gøtu millum nýggja gøtu 1 við Hoyvíkar skúla og nýggja gøtu 2 við kirkjugarðin –
   a. er mestsum komin á mál og góðkend av teimum ið koyra líkbilin

Umsitingin gjørdi eitt uppskot til umlegging av gøtupetti 1, og varð hetta uppskotið lagt fyri á fundi í skúlastýrinum 10.02.2022.
Skúlastýrið tók undir við uppskotinum til umlegging av gøtuni.
Skreiðibakkin er ikki tikin við í uppskotið, og er ivasamt um tað kann innarbeiðast í broyttu farleiðina.

Umlagda gøtan er munandi meira krevjandi at gera, eftirsum talan verður um nógvan grevstur, brekking og størri tilfarsnýtslu fyri at byggja undirlagið til gøtuna og skráarnar upp.

Arbeiðstakarin metir, at henda umlegging hevur ein meirkostnað við sær á 437.755,69 kr.

Harumframt verður neyðugt við átøkum at tryggja at ongin ferðsla verður á Kirkjugarðsleiðini undantikið líkbilur, gangandi og súkklandi. Forðingar verða settar við innkoyringina oman fyri skúlan, oman fyri hoyvíkshøllina og við sambandi til Klingruna, og forboðsskelti har allar gøtur koma inná leiðina.
Mælt verður somuleiðis til at fríðka um, planta og gera ljós á hetta økið. Mettur kostnaður 100.000,- kr.

**Skjøl:**
21/01366-24 10_02_2022 Kirkjugarðsleiðin Hoyvíkar skúli_framløga skúlastýrið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 540.000,00 á konto 6275, L62047, Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík av LK62997, Lendisgøtur og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðsleiðin var ynski frá byrjan av, tá ið kirkjan og kirkjugarðurin vórðu bygd, soleiðis at seinasta leiðin er vøkur og virðilig.
Kirkjugarðsleiðin er ikki vegur, men gøtufarleið til líkbilin við jarðarferðir, umframt farleið fyri gangandi og súkklandi.
Koyriforboð er fyri bilar og prutl/motorakfør.

Arbeiðið varð boðið út til 2 arbeiðstakarar í 2021, og varð sáttmáli gjørdur við arbeiðstakaran við lægra tilboðnum.

| | |
|---|---|
| Sáttmáli áljóðandi | 1.255.332,29 |
| Ískoyti til sáttmála fyri broytta gøtuleið omanfyri Hoyvíkar skúla | 437.755,69 |

| | |
|---|---|
| Meirveitingar smb. uppgerð nøgdarlista | 200.350,00 |
| Meirkeyp, skelting beinkir o.a. áljóðandi | 145.279,02 |
| Avlop | 1.283,00 |

Peningur varð játtaður til endamálið 6275 L62047 Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík soleiðis:

| | |
|---|---|
| Apríl 2021 6275 L00001 Fríðkan av kommununi | 250.000,- |
| September 2021 LK62046 Løgukarmur fríðkan av býnum | 950.000,- |
| September 2021 LK62035 Løgukarmur vetrarfriðing | 300.000,- |
| Mai 2022 LK62997 Lendisgøtur | 540.000,- |
| Íalt: | 2.040.000,- |

Smb. sáttmálatíðarætlanini skuldi ætlanin avhendast 30.06.2022, og varð hon hóast broytingar í linjuføring av gøtuni og avbjóðingar orsakað av veðri avhendað longu 12. juli 2022. Kirkjugarðsleiðin varð alment tikin í nýtslu 12. juli 2022.

Arbeiðið er sostatt liðugt, og restupphæddin á verkætlanini er áljóðandi kr. 1.283.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62047 | Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík | 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | | 1.283 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at loka verkætlanina L62047, Kirkjugarðsleiðin, flyta avlopið á kr. 1.283 á karmin LK62999, Fríðkan av býnum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 77/23 Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 95/22 | 22/01036-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 32/22 | 22/01036-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 98/22 | 22/01036-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 92/22 | 22/01036-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 41/23 | 22/01036-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 78/23 | 22/01036-1 |
| 7 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 77/23 | 22/01036-1 |

**Upprunin til málið**
8. mars 2021 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í málinum Vágsbotnur – skipan av økinum (j.nr. 18/00808) at heimila umsitingini at skipa Vágsbotntorgið yvir summarið við at innlima ymisku áhugapartarnar, soleiðis at fyribils verkætlanin kann virka undir eini endaligari skipan av økinum.

**Lýsing av málinum**
Í Miðbýarætlanini frá 2016 *(*Miðbýarætlan_juni 2016*, J.Nr. 22/01036-11)* varð ein ætlan løgd fyri hvussu arbeiðast kann skynsamt við menningini av ymsum økjum í býnum.
"Fyribils átøk sum amboð" var til dømis ein menningarháttur, har býarskipanarlig menningarstig eitt nú kundu setast upp sum royndarverkætlanir til tess síggja hvussu ymisk átøk kundu roynast sum ein varandi loysn fyri útvald øki í býnum. Eitt av hesum økjunum var býarrúmið í Vágsbotni, ið sambært ætlanini skal mennast sum partur av mentanargøtuni í Tórsgøtu og sum eitt miðsavnandi miðbýartorg.

Í 2020 varð arkitektakapping útskrivað at skipa miðbýartorgið í Vágsbotni. Zeta Arkitektar áttu vinnandi hugskotið, men grundað á serligur viðurskiftini í økinum, og tí at endaliga nýtslan av økinum ikki hevur verið roynd áður, so var avgerð tikin um at royna aðrar menningarmøguleikar í økinum fyrst, soleiðis at ein fyribils verkætlan kann liggja til grund fyri eini endaligari skipan av økinum.

Í hesum sambandi er ein arbeiðsbólk settur at arbeiða við eini fyribils royndarætlan av torginum í summar. Arbeiðsbólkurin er mannaður av:

- Biritu Wardum, býararkitekti í Tórshavnar kommunu.
- Liljuni Weihe, stjóra í Visit Tórshavn.
- Boga Andreasen, rakstrarleiðara í mentanarhølunum í Tórsgøtu
- Høgna L*ü*tzen, stjóra í byggibúðini, Valdemar L*ü*tzen, sum umboði fyri vinnurekandi í nærumhvørvinum.

Jóannesi B. Lamhauge, arkitektur á Býarskipanardeildini virkar sum verkætlanar samskipari av royndarætlanini.

Arbeiðsbólkurin skal saman taka støðu til, hvussu Vágsbotnur kann endurskipast sum býarrúm í eini fyribils verkætlan fyri summarið 2022, har ymisk menningarátøk verða roynd í verki.

Verkætlanin snýr seg um at gera eina býarskipanarliga royndarverkætlan í Vágsbotni fyri summarið 2022, sum kann gerast ein leistur fyri hvussu økið kann mennast í framtíðini til eina varandi loysn. Sí viðheft

skipanaruppskot og íløguætlan: Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, j. nr. 22/01036-20, sum lýsir nakrar tankar fyri økið, men, sum tó ikki er bindandi fyri hvat fer at verða gjørt.

Umhvørvið í Vágsbotni spælir ein týdningarmiklan leiklut í mun til hvussu miðbýurin í Havn kennist á summarhálvuni. Mongu seinastu árini hevur økið undir Bryggjubakka verið karmur um eitt vaksandi virksemi hvat trivnaði og frítíðartilboðum í miðbýnum viðvíkur. Fólk leita sær oman her í góðveðri, tí her ber til at njóta sólargóðu uppihaldsumstøðurnar í einum lutfalsliga bilfríum maritimum umhvørvi.

Í verkætlanini verða karmarnir í Vágsbotni og undir bryggjubakka mentir, so at teir í størri mun kunnu hýsa uppihaldi, trivnaði, frítíðarlívi, útimarknaði og áhaldandi tiltøkum í summarmánaðunum frá mai til september 2022.
Í verandi løtu ber økið í Vágsbotni brá av at vera óskipað, og er í dagliga brúkinum darvað av fløktum ferðsluviðurskiftum í bili og til gongu. Somuleiðis er lendið ójavnt, og samansett við ymsari álegging, ið bæði misprýðir um økið, og sum í støðum ger tað torført og vandamikið at ganga hjá summum.
Harafturat er økið í verandi løtu innrættað so, at bilferðslan er løgd ígjøgnum partin av Vágsbotntorginum við besta sólargangi, ímeðan økið har borðbeinkir eru uppsettir aloftast liggur í skugga og kennist kalt. Við atliti til at økið eigur at raðfestast sum eitt uppihaldstorg, metir arbeiðsbólkurin, at hendan skipanin av økinum eigur at verða umskipað, soleiðis at funktiónirnar verða staðsettar øvut.

Avbjóðingarnar í sambandi við at menna økið sum heild hava verið, at ferðsluviðurskiftini í økinum ikki hava verið loyst á ein nøktandi hátt. Og í sambandi við fyrrverandi ætlanir, sum eru gjørdar fyri økið, hava vinnurekandi áhugabólkar í nærumhvørvinum lagt dent á, at ferðslan í økinum ikki má tarnast hóast økið verður ment. Arbeiðsbólkurin er samdur í, at ferðslan eigur at gerast einvegis út á Skálatrøð frá Tórsgøtu, meðan Mylnugøtu verður framhaldandi við ferðslu báðar vegir.

Av tí at økið harðliga treingir til nýskipan og umvæling, er tað tí hugsandi, at ymisk ætlað fyribilsinntriv, sum arbeiðsbólkurin metir vera neyðug, kunnu gerast uttan at bera ótta fyri at ein ger seg inn á økið.

Sum ein royndarverkætlan fyri summarið 2022 verður tí skotið upp at arbeitt verður við bæði:

- Eini nýggjari skipan av økinum við eini umlagdari vegføring og við einum nýggjum marknaðartorgi við býarrúmsinnbúgvi og einum palli til stórskerm, tónleik og onnur tiltøk.

- Og eini tiltaksætlan, har minst ein samskipari verður settur at skipa fyri áhaldandi tiltøkum og trivnaðartilboðum ígjøgnum summarið.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd fyri verkætlanina, sí skjal Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, j. nr. 22/01036-20, har samlaði kostnaður fyri royndarverkætlanina áljóðandi 2,7 mió. kr. er útgreinað, her íroknað samskipan av teimum átøkunum, sum skulu liggja til grund fyri at skapa lív í økinum yvir summarið.
Í sambandi við fígging av verkætlanini, so eru kr. 1,5 mió. játtaðar til endamálið á L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum. Írestandi fígging áljóðandi kr. 1,2 mió. skal sostatt raðfestast afturat, fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vanliga ferðslulógin fyri koyring í miðbýarumhvørvi er galdandi.

Viðmælt verður tó, at skeltast má, so at hámarksferðin ígjøgnum økið verður tálmað til í mesta lagi 15 km/t.

Sambært verkætlanini skal vegurin út á Skálatrøð einsrættast ígjøgnum Vágsbotn so at bert er koyrandi út.

Ongar ásetingar verða fyri koyring út eftir Bryggjubakka, men her kann skeltast, so at vegurin bert skal nýtast til ørindakoyring.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Her verður gjørt vart við, at umtalaða økið í Vágsbotni í verandi løtu er eitt ógvuliga ferðslutungt øki við nærum 5000 gjøgnumkoyrandi bilum dagliga. Sí skjalið: Ferðsluteljingar í Vágsbotni, *j. nr. 22/01036-21 og* Staðseting av ferðslumátara, *j. nr. 22/01036-18.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Miðbýarætlan – Heildarætlan fyri Miðbýin (j. nr. 16/00491)
Umsókn um byggiloyvi til breiðkan av bryggjuni í Vágsbotni (j. nr. 21/01351)
Kunning til grannar um royndarverkætlanina Skoytubreyt í Vágsbotni (j. nr. 20/04338)
Vágsbotnur – Skipan av økinum (j.nr. 18/00808)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ferðslunevndin ger vart við, at eitt broytt ferðslumynstur í økinum verður gjørt í samráð við ferðslunevndina.

**Skjøl**
Miðbýarætlan_juni 2016*, J.Nr. 22/01036-11*
Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, *j. nr. 22/01036-20*
Ferðsluteljingar í Vágsbotni, *j. nr. 22/01036-21*
Staðseting av ferðslumátara, *j. nr. 22/01036-18.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | x | x |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | x | x |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við verkætlanini og at játta kr. 200.000 av LK62034 Vágsbotnur – skipan av økinum fyri árið 2021 og kr. 1 mió. av LK62019, Lendisgøtur til at fremja verkætlanina Menning av Vágsbotni – ætlan fyri summarið 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at kr. 1 mió. verður tikin av LK62996 Miðbýarætlan.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at verkætlanin eisini skal umfata gongubreytir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg, ið er soljóðandi:

Mælt verður til, at verkætlanin eisini umfatar súkklubreyt.

Broytingaruppskotið fall við átta atkøðum ímóti og fimm atkvøðum fyri.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Jan Christiansen.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sjøtul varð settur á «Royndarverkætlanina fyri Vágsbotn» á vári í 2022 m.a. við eini nýggjari ferðsluleið uttan um eitt sólargott uppihaldsøki, ið knýtir Tórsgøtu, sititrappuna og økið undir bryggjubakka saman. Hetta nýggja býarrúmið hevur síðani verið rúmligur karmur um ymisk tiltøk, sum t.d. staðbundnan matmarknað, filmssýningar og konsertir og høgtíðir sum t.d. Ólavsøku og Jól.

Endamálið við hesi royndarverkætlanini er, at royna ein nýggja skipan av økinum við ymsum fyribils broytingarátøkum, ið lættliga kunnu tillagast og broytast líðandi. Soleiðis kann nevniliga arbeiðast við veruligum brúkararoyndum fram ímóti eini tilvitaðari og endaligari skipan av hesum økinum.

Arbeiðsbólkurin, sum á vári í 2022 tók støðu til, hvussu økið skuldi nýskipast í royndarverkætlanini, hevur síðani eftirmett, hvussu verkætlanin hevur hepnast higartil, og hvussu arbeiðast skal víðari fram ímóti at menna eina endaliga skipan fyri Vágsbotn sum torg og alment býarrúm.
Niðurstøðan frá eftirmetingini er m.a., at royndarverkætlanin í Vágsbotni skal halda fram í eitt tíðarskeið afturat, soleiðis at møguleikarnir við nýggja økinum kunnu roynast til fulnar, og at fleiri royndir kunnu gerast við hesi verkætlanini. Tess fleiri royndir vera gjørdar, tess fleiri metingar og tilvitaðar avgerðir kunnu verða tiknar í sambandi við endaligu skipanina av økinum.

Eins og í 2022 verður skipað fyri ymsum savnandi tiltøkum í Vágsbotni og í býnum sum heild, har samskipari verður settur at gera eina skrá og stíla fyri áhaldandi tiltøkunum yvir summarið. Kostnaðurin av samskipan og tiltøkum verður mettur at verða uml. kr. 700.000 íroknað mvg.

Um royndarverkætlanin skal halda fram á ætlaðan hátt, er tó neyðugt, at ymsar tillagingar og ábøtur verða gjørdar í økinum. Sum dømi kunnu nevnast:
- at gongurenslið ígjøgnum økið er ov illa uppmerkt og má vera tryggari og meira greidliga skipað, bæði fyri fólk til gongu og á súkklu.
- at fyri at tiltøk kunnu haldast í økinum, uttan at neyðugt er at steingja økið fyri bilaferðslu, so er neyðugt at gera ferðsluforðingar og girðingar ímillum uppihaldsøki og bilveg.
- at tað er ov myrkt hjá fólki at ganga í økinum um kvøldarnar. Ljós er við til at gera økið trygt og hugnaligt at uppihalda sær í.
- at tað somuleiðis er neyðugt at gera smávegis ábøtur/viðlíkahald á verandi øki, so sum at yvirflatuviðgera plattin ímóti hálku, útskifting av hitalampuskipan, træverja, ábøtur á el-skipanina, og røkt av niðursettum vøkstri í økinum.

Talan er um tillagingar, sum skulu betra um trygdina í ferðsluni, til gongu, umframt at betra um trivnaðin og menna umstøðurnar sum heild.

Til tess at arbeiðast kann á skjótasta hátt fram ímóti sumrinum 2023, so verður partur av arbeiðinum gjørt av umsitingini, umframt at samstarv somuleiðis er við EYA arkitektar, sum áður hava verið knýttir at verkætlanini í sambandi við at staðseta standmyndina av Nólsoyarpálli í Vágsbotni.

Mælt verður samstundis til, at almenninginum fær høvi at gera viðmerkingar til royndarverkætlanina á heimasíðuni torshavn.fo.

Átøkini, sum skulu gerast í sambandi við Menningina av Vágsbotni í 2023, íroknað rágevarakostnaðin, verða mett at kosta uml. kr 1.000.000 uttan mvg.

Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri standandi íroknað óvæntaðar útreiðslur er mettur at vera kr. 2.000.000 íroknað mvg.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Játtanin á verkætlan L62053, Menning av Vágsbotni á kr. 1.200.000 inngongur í arbeiðið, sum varð gjørt í 2022. Mælt verður til, at verkætlanin verður lokað, og at játtanin verður flutt yvir á L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | L62034 | Vágsbotnur – skipan av økinum | | 2.000.000 |
| 6275 | L62053 | Menning av Vágsbotni | 6275 | L62034 | Vágsbotnur – skipan av økinum | | 1.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr 2.000.000 av LK62999, Fríðkan av býnum til L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum,
- at loka L62053, Menning av Vágsbotni og flyta játtanina á kr. 1.200.000 á L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum,
- at heimila umsitingini at arbeiða víðari við málinum, gera sáttmálar og seta arbeiðini í verk, sum lýst omanfyri,
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 282<br><br>Formansins merki: |

# 78/23 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 3/23 | 22/07300-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 23/23 | 22/07300-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 25/23 | 22/07300-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 78/23 | 22/07300-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin ivi er um, at við einum fjølbroyttum bústaðarmarknaði kann kommunan virka fyri eini fjøltáttaðari fólkasamanseting. Týdningarmikið er, at fjølbroytni vísir seg innan bústaðarsløg. Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum í kommununi, men ikki nógv lendi er eftir. Í Føroyum hevur ikki verið siðvenja at byggja háhús. Fyrimunurin við hesi búseting er, at lendið verður gagnnýtt á ein munagóðan hátt. Vansin er tó, at háhús kunnu ávirka útsýnið hjá verandi bústøðum umframt kennast stór í vavi. Tí er sera týdningarmikið, at staðsetingin av hesari bygging er gjølla kannað. Kommunan kann gera sítt fyri at stýra planleggingini ávísar vegir, t.d. við at útleggja tey kommunalu grundstykkini við ávísum ásetingum. Í hesum sambandi verður farið undir at broyta byggisamtyktina framvið hamarinum á Villingardalsvegnum og suðureftir, frá at vera A3, blandað bústaða- og miðstaðabygging, til A2, hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.

**Lýsing av málinum**
Matriklarnir 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 liggja vestan fyri Villingadalsvegin. Matriklarnir liggja sum ein leinging av einum hamara. Hamarin gongur sum ein rond allan vegin suðureftir oman framvið Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga hevði tað verið upplagt at nýtt tøku matriklarnar framvið hamarinum til hægri bygging. Bæði tí at teir ikki taka útsýnið frá nøkrum, bygningarnir kunnu fáa útsýni yvir allan býin, umframt at hamarin skapar lívd frá vesturættini.

Sum nú er, liggja matriklarnir í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí fylgiskjal *Áðrenn broyting*. Ætlanin er at broyta ásetingarnar fyri hesar matriklarnar til økisáseting A2 í almennu byggisamtyktini, sum er ætlað høgari bústaðabygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A2 í 3. grundumráði eru:

*1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

*2. Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

*3. Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

*4. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

*5. Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/07300-2 Áðrenn broyting
22/07300-2 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn, sambært kortskjali *Eftir broyting* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fundir hava verið við nakrar av matrikuleigarunum, ið ynskja at varðveita verandi byggisamtyktarásetingina A3 fyri teirra matriklar. Umsitingin metir ikki, at hetta hevur stórvegis ávirkan á ta yvirskipaðu býarmyndina, og mælir tí til, at uppskotið um broyting av byggisamtyktini frá A3 øki til A2 øki, verður tillaga til einans at fevna um matr.nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, við Villingardalsvegin, Tórshavn, sambært kortskjali *Eftir broyting 01.02.2023* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 79/23 Miðbýarætlan – Býarlundin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 2/23 | 22/07295-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 15/23 | 22/07295-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 22/23 | 22/07295-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 46/23 | 22/07295-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 76/23 | 22/07295-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 79/23 | 22/07295-1 |

**Upprunin til málið**
Ein miðbýarkjarna eigur at vera innbjóðandi og at leggja upp til, at fólk hittast og hava fyrstarætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir. Politiskt er ynski um at stimbra undir hesi viðurskifti, og í summar varð arbeiðið boðið út at gera skipanaruppskot av miðbýarkjarnuni. 14. desembur 2022 var skipanaruppskotið 'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjølbroyttur og grønur miðbýur' latið inn.

**Lýsing av málinum**
Sum partur av skipanaruppskotinum 'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjølbroyttur og grønur miðbýur' liggur uppskotið 'Grøna gongugøtan og býarlundin'.

Prátið hevur verið í mong ár um at gjørt hendan partin av Niels Finsens gøtu til gongugøtu. Royndir hava verið gjørdar, tó uttan ynskt úrslit. Úrslit aðrastaðni hava víst, at tað er sera trupult at meta um úrslitið av einari 'royndarverkætlan', tí allir partar 'bíða eftir', at royndin er liðug. Tí mugu skilvísar, men endaligar, avgerðir takast hesum viðvíkjandi.

Uppskotið vísir eitt bilfrítt strekki frá Steinatúni oman á Vaglið – tó verður loyvt bilum at koyra tvørtur um gongugøtuna á krossinum Niels Finsens gøta/Sverrisgøta, og sjálvandi skal vera gjørligt við vøru- og ruskkoyring í ávísum tíðarbilum og hjá neyðsynjarakførum at koma fram.

Somuleiðis skulu atlit havast at ólavsøkuskrúðgonguni, sum hevur ein heilt serligan leiklut og tign í býnum, at hon fær tað plássið, ið krevst oman eftir gøtuni, og at atgongd inn á Tinghúsvøllin verður varðveitt.

Gongugøtan skal hugsast sum ein 'pallur', ið bjóðar inn til ymiskt og fjøltáttað virksemi, bæði gerandisdagar og til serstøk høvi. Gøtan skal gerast grønari, og nýggj gróðurseting av 'allé-trøum' skapa saman við stóru gomlu trøunum umframt nýggju Havnará eina grøna 'tekju' yvir partar av gongugøtuni, sum gevur økinum lív og ein heilt serstakan 'urtagarðsdám'.

Verkætlanin 'Grøna gongugøtan og býarlundin' er ein lendisskipan og ein plantuætlan av strekkinum á Niels Finsens gøtu úr Steinatúni og oman til Vaglið, umframt ráðhúsplássið og Eik-garðurin (býarlundin). Uppskotið vísir harumframt á, at ráðhústorgið kann vera skipað við parkering undir jørð, innbygdari skoytubreyt og flytiligum møblum við grønum plantukummum, sum geva møguleika fyri fjølbroyttari nýtslu alt árið, og sum eru ómakaleysir at flyta í sambandi við størri tiltøk sum konsertir, skoytubreyt o.a. Býarlundin skal vera ein grøn lund við t.d. smábarnaspæliplássi og eini multifunktionellari, partvíst yvirdekkaðari pavillon til tiltøk og framsýningar.

Við at gera gongugøtuna bilfría og urtagarðskenda, fáa nýggju ætlaðu bústaðirnir í miðbýarkjarnuni eitt uttandura fríøki til uppihald. Tað verður neyvan pláss fyri at uppfylla vanligu kravdu áseting um fríøki til allar hesar íbúðirnar, og tí kunnu grøna gongugøtan og býarlundin virka sum eitt fríøki til hesar bústaðirnar.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt at fara undir at gera skipanaruppskot av arbeiðstøkuøkinum 'Grøna gongugøtan og býarlundin' fyri síðani at meta um, hvussu vit kunnu býta skipanaruppskotið í undirøki, ið síðani verða liðugt projekterað og sett í verk. Her kundi 'Býarlundin' (eik-garðurin) verið fyrsta raðfesting.

Í hesum sambandi er sera týdningarmikið at fara undir eina tilgongd at hoyra áhugapartar, ið eru beinleiðis ávirkaðir av grønu gongugøtuni og býarlundini. Tá henda tilgongd er liðug, verður kallað inn til almenna kunning um uppskotið.

Umsitingin hevur heitt á ráðgevan um at upplýsa ein kostnað fyri arbeiðið at gera eitt neyvt skipanaruppskort av 'Grønu gongugøtuni og býarlundini'. Kostnaðurin er áljóðandi kr. 187.200 u/mvg.

Afturat hesi upphædd er skynsamt at rokna eina óvissu uppí, ið vanliga verður sett á 10% umframt útreislur fyri møguligar uppmátingar, fundir, prent o.a.

Sostatt er talan um ein samlaðan kostnað áljóðandi kr. 300.000 fyri gerð av skipanaruppskoti og fyrireikan av útbjóðing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/03571 Miðbýarkjarnan

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/07295-6 Skipanaruppskot – býarlund februar 2023.pdf_redsize.pdf.
22/07295-9 Avtala millum TK og Eik

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |

| Upphædd |
|---|

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | xx | Miðbýarætlan - Býarlund | Nýggj verkætlan | | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 300.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta kr. 300.000 av konto LK62996 Miðbýarætlan á nýggja verkætlan við heitinum Miðbýarætlan – Býarlund
- at umsitingin og ráðgevi fara undir at lýsa verkætlanina, gera neyðugar kanningar og seta í verk skipanaruppskotið
- at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út eftirfylgjandi
- at avvarðandi nevndir verða kunnaðar so líðandi
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tann 22. februar 2023 læt ráðgevin inn skipanaruppskot av Býarlundini, sí viðhefta uppskot j. nr. 22/07295-6, Skipanaruppskot – Býarlundin februar 2023.pdf_redsize.pdf
Soleiðis stendur skrivað í uppskotinum:

*"Nýggja býarlundin verður grøna hjartað í bilfría miðbýnum.*
*Býarlundin verður staðið, har íbúgvarnir í miðbýnum hittast til ein kaffimunn á grasfløtuni ein góðan summardag, har tey halda marknaðardagar um heystið, og har børnini gera kavamenn um veturin.*

*Býarlundin verður felags urtagarðurin hjá miðbýarbúgvum.*
*Samstundis verður býarlundin eisini staðið, har Ráðhústorgið og Tinghúsvøllurin smelta saman, har pláss verður fyri at skipa fyri alskyns tiltøkum, og nýggja pavilliongin fer at virka sum ein multifunktionellur pallur, har møguleikar vera at skipa fyri konsertum, framførslum og framsýningum av ymsum slag."*

Uppskotið er umrøtt við ráðgevan, og er avgjørt at fara undir smærri tillagingar.

Næsta stigið verður at fáa eina avtalu við Betri banka um ætlanirnar, hetta tí at lundin partvís liggur inni á matr. nr. 383, sum Betri banki eigur. Í 2009 bleiv avtala millum tá verðandi Eik banka og Tórshavnar kommunu gjørd um at seta havan inni á økinum, sum Eik banki eigur, í stand, sí fylgiskjal *Avtala millum TK og Eik.* Eik banki rindaði fyri arbeiðið á økinum og samtykti, at arbeiðið bleiv gjørt samvarandi myndum og tekningum, sum Tórshavnar kommuna útflýggjaði. Henda avtalan broytti ikki á nakran hátt ræðisrættin hjá nøkrum av pørtunum til sín part av økinum. Tískil skal ein avtala um verkætlanina gerast, sum eisini

kemur at fevna um eina røktaravtalu í sambandi við viðlíkahald av einamest tí grøna elementinum í Býarlundini.

Framhaldandi tilgongdin verður, at farið verður undir samráðingar við J&K Petersen um at standa fyri arbeiðstøkuni. Grundgevingin fyri, at farið verður í samráðingar við J&K Petersen, er tann, at fyritøkan stendur fyri at gera Havnará og er tí virkin í økinum, og partur av økinum, har lundin er ætlað, er latin teimum sum byggipláss.

Sostatt er ætlanin at fara undir eitt slag av einum partalagi millum kommununa, arbeiðstakaran og ráðgevan við tí endamáli at fáa sett sjøtul á verkætlanina sum skjótast.

Enn er eingin ítøkilig kostnaðarmeting gjørd av arbeiðinum, men fyri at seta sjøtul á arbeiðið, so verður mett, at neyðugt verður við eini 3,5 mió kr til alt arbeiðið, her undir ráðgeving, útinning osfr.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | L62057 | Miðbýarætlan - Býarlundin | | 3.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.800.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta kr. 3.800.000 av konto LK62996 Miðbýarætlan á L62057, Miðbýarætlan – Býarlundin.
- at heimila umsitingini at arbeiða víðari við málinum, gera sáttmálar og seta arbeiðið í verk.
  beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023**: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 80/23 Almannamálaráðið : Umsókn um grundøki til vardar bústaðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 45/23 | 22/04373-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 75/23 | 22/04373-4 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 80/23 | 22/04373-4 |

**Upprunin til málið**
Almannaráðið hevur sent umsitingini umbøn um grundøki til vardar bústaðir.

**Lýsing av málinum**
Almannaráðið er farið undir eina tilgongd at útvega bú- og umlættingarpláss til fólk við serligum tørvi. Talan er um at byggja stovnar, sum m.a. skulu hýsa fólki við autismu, sálarsjúku og menningartarni. Almannaráðið ynskir at kanna møguleikarnar í m.a. Tórshavnar kommunu, og hevur tískil sent umsitingini umbøn um at leggja trý grundøki av til Almannaráðið at byggja vardar bústaðir og virknistilboð á. Hesar byggiætlanir verða eftir ætlan framdar tey næstu 10 til 15 árini.

Yvirskipað fyri allar byggiverkætlanirnar er, at grundøkini liggja í ella tætt upp at vanligari bústaðabygging, og at tað ikki verður bygt ov tætt við møguligt annað tilboð av sama slag. Somuleiðis verður ynskt, at grundøkini hava eina ávísa stødd við lítlum ella ongum halli, og ikki eru ov kostnaðarmikill at gera byggibúgvin ella at koma til, umframt at tey liggja tætt við busssamband.

Í løtuni verður arbeitt ítøkiliga við eini byggiverkætlan, sum fevnir um eitt sambýli til fólk við autismu til 24 búfólk, bygt í fýra eindum við seks íbúðum í hvørjari eind. Enn er ikki avgjørt um bygt verður í einari ella tveimum hæddum, men tørvur er á einum grundøki áljóðandi 4000m$^2$ til hesa verkætlan. Ætlanin er at byrja byggingina í seinnu helvt av 2023.

Til hinar báðar verkætlanirnar er tørvur á grundøkjum á umleið 4000-5000 m$^2$, og verður væntandi byrjað at byggja í 2024-2029.
Tvey økir hava ítøkiliga verið umrødd at leggja av til Almannaráðið. Hesi eru:

1. Øki til stovn í útstykkingini omanfyri Argjahamar, sí kortskjalið Argjahamar_Øki til Almannaráðið.

   Avmarkaða økið (ljósareyð avmarking), sum er lagt av til bústovn, er omanfyri syðstu sethúsini á Argjahamri, og fevnir um eitt øki áleið 9250 fermetrar til støddar, sum er væl størri, enn tørvur er á, til ítøkiligu byggiverkætlanina. Økið liggur upp at nýggju útstykkingini á Argjum, har miðað verður ímóti at skipa útstykkingina lutvíst út frá verandi grannalagi á Argahamri, sum er samansett við sethúsum og raðhúsum. Ynskiligt er, at stovnsbyggingin somuleiðis leggur seg upp at hesi skipan, tá hugsað verður um stødd og skap á bygningum.

   Býarskipanarliga er óheppið at staðseta fleiri stovnar tætt upp at hvør øðrum, men avmarkað er við møguleikum og lendi í bygda býnum.

2. Øki til stovn í útstykkingini á Stórutjørn, sí kortskjalið Stóratjørn_Øki til Almannaráðið.
   Arbeitt verður í løtuni við eini heildarætlan fyri Stórutjørn, sum verður nýggjur býarpartur í Hoyvík. Býarparturin, sum er ein endurtulking av føroyska liviháttinum, fevnir um fýra býlingar við náttúruni sum nærmasta granna, har dentur verður lagdur á nærsamfelagið við nýmótans býarbygging við íblástri frá býlingum sum á Reyni.

Økið, ið er lagt av til stovnsbygging, er í býlingi 1, men er talan um eitt øki, sum í framhaldandi tilgongdini saman við ráðgevunum má tillagast í skipan og stødd eins og hetta er treytað av, at heildarætlanin verður góðkend. Almannaráðið hevur tørv á einum øki áleið 4000-5000 fermetrar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið á Argjum er fevnt av økisásetingini A3 í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Virksemið rúmast tískil innanfyri økisásetingina, men kann útstykking bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Avmarkaða grundøkið liggur upp at eini á, og skal ein byggilinja tí ásetast, ið skal vera við til at tryggja eina frástøðu millum á og bygging. Harafturat má eitt hóskandi øki frámatrikulerast til endamálið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fundur hevur verið við umboð frá Almannaráðnum, har umsitingin umrøddi møguligar staðsetingar. Í fyrsta umfari varð víst á tveir ítøkiligar møguleikar, har talan er um grundøki við Stórutjørn og grundøki á Glyvursnesi (omanfyri sethúsini á Argjahamri). Almannaráðið vísti áhuga at keypa hesi bæði grundøkini.

Eftir ætlan verður farið í eina tilgongd við Almannaráðið at nágreina eina skipan av øki og bygging á økinum á Argjum, áðrenn eitt hóskandi øki kann frámatrikulerast til endamálið.

Økið á Argjum verður selt Almannaráðnum fyri kostnaðarprís.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skipan av Stórutjørn, journal nr. 18/03468
Útstykking oman fyri Argjahamar, journal nr. 21/01777

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Argjahamar_Øki til Almannaráðið, journal nr. 22/04373-5
Stóratjørn_Øki til Almannaráðið, journal nr. 22/04373-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at leggja grundøki við Stórutjørn, samb. kortskjali Stóratjørn_Øki til Almannaráðið við neyðugum tillagingum av til Almannaráðið.
- at leggja grundøki í útstykkingini omanfyri Argjahamar, samb. Argjahamar_Øki til Almannaráðið av til Almannaráðið.
- at beina málið í fíggjarnevndina at gera endaliga avtalu við Almannaráðið um omanfyri standandi, fyri síðani at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen tekur undir við at lata grundøkið omanfyri Argjahamar til Almannamálaráðið. Grundað á , at økið kring Stórutjørn er eitt vátlendi, verður ikki tikið undir við at lata økið har til bygging.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Elsa Berg og Annika Olsen løgdu fram soljóðandi broytingaruppskot:

Skotið verður upp at lata Almannamálaráðnum økið við Argjahamar til Bústovn men at finna annað stað enn Stórutjørn. Hetta orsakað av vátlendinum við Stórutjørn.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fýra atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Jákup Dam, Gunvør Balle, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen.

## 81/23 Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.02.2018 | 5/18 | 18/00173-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 31/18 | 18/00173-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 45/18 | 18/00173-1 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 44/18 | 18/00173-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 34/19 | 18/00173-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.07.2019 | 133/19 | 18/00173-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 67/20 | 18/00173-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 99/20 | 18/00173-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 131/20 | 18/00173-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 103/20 | 18/00173-1 |
| 11 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 122/20 | 18/00173-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 246/20 | 18/00173-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 361/20 | 18/00173-1 |
| 14 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 315/20 | 18/00173-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 37/23 | 18/00173-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 84/23 | 18/00173-1 |
| 17 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 81/23 | 18/00173-1 |

**Upprunin til málið:**.
Landsverk hevur, í sambandi við at nýggjur landsvegur varð gjørdur úr Havn til Gomulrætt, heitt á Tórshavnar kommunu um at taka yvir aftur vegateinin, sum gongur um Sandá, frá traðunum til íbinding í landsvegin har (sí hjáløgdu tekning). Málið er eisini vorið aktuelt í sambandi marknaumskipan millum hagarnar, sum hava mark har.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tá landsvegur varð gjørdur av nýggjum úr Havn til Gomlurætt, vórðu nakrir vegateinar, sum komu at liggja uttan fyri henda nýggja vegin. Gamli vegurin úr Havn til Velbastaðar og Kirkjubøar er frá fyrst í átjandu øld.

Tá ein landsvegur verður avloystur av nýggjum landsvegi, fellur gamli vegurin aftur til fyrrverandi eigaran, um hesin vil tað, og eftir møguliga samráðing. Við tað at hesin vegurin var kommunalur, innan hann gjørdist landsvegur í 1964, kann hann tí fella aftur til kommununa. Tað eru nøkur viðurskifti ið tala fyri, at kommunan yvirtekur vegateinin, sum er lýstur á hjáløgdu tekning:

- fyrst og fremst er tað gamla brúgvin frá umleið 1925 og sum Villiam Tórsheim (keisarin nevndur) lagaði og sum tí hevur søguligt virði fyri kommununa. Ynskir kommunan at varðveita og møguliga endurskapa partar av brúnni, er tað av stórum týdningi at eigaraviðurskiftini eru greið.
- Vegurin har er samstundis vegatkoma til traðirnar niðan fyri Velbastaðvegin við Norðasta Horn, í vestara enda. Tí kann hesin vegurin frameftir trygga vegatkomu til partar av hesum øki í mun til møguliga framtíðar búseting her.
- Ein møgulig framtíðar gøtuskipan millum Havnina og Velbastað/Kirkjubø kann inndraga hendan vegateinin.

Tey viðurskifti sum møguliga tala ímóti at yvirtaka henda landsvegin eru:

- Nakað av fíggjarligum bindingum fylgja við, at kommunan yvirtekur vegastubban og gerst vegamyndugleiki. Serliga við at seta í stand, reka og viðlíkahalda gomlu grót-brúnna. Okkurt smávegis má roknast við asfaltering, tó ferðslan her er sera avmarkað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum

**Umhvørvisárin**
Brúgvin hevur siðsøguligt virði fyri kommununa, og hevur virðir sum bygningsverk, sum varði yvir handverk sum ikki er vanligt í dag.

**Skjøl:** Havnardalur kort j. nr. 18/00173-2
Brúgvin um Sandá gomul klipp j.nr. 18/00173-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | x | x | x | |
| Umhvørvis avleiðingar | x | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingur mælir til, at umsitingin fær heimild til at gera neyðugar avtalur um at yvirtaka og staðfesta eigaraviðurskifti av vegi og brúgv.

**Tekniska nevnd 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heitir á umsitingina um at gera eina kostnaðarmeting av at seta brúnna í uppruna stand.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið prosjekttilfar og kostnaðarmeting uppá afturgerð av gomlu brúnni frá uttanhýsis ráðgeva. Kostnaðarmetingin frá uttanhýsis ráðgeva uppá handverkaraútreiðslur er áljóðandi 1.550.696 kr. u/mvg, men má arbeiðið bjóðast út, fyri at kenna kostnaðin nærri. Harafturat kemur ókent, ráðgeving, eftirlit, leiðsla o.s.fr.

**Eigaraviðurskifti:**
Samskifti hevur verið millum Landsverk, Umhvørvisstovuna og Tórshavnar kommunu um eigaraviðurskiftini. Brúgvin er samband millum markatalsbygd 38 Velbastaður og 55 Tórshavn. Brúgvin er

partur av gamla landsvegnum, ið er frábýttur í litra í markatali 55, men liggur sum partur av matr nr 4a “Syðri Spakiseyður” í markatali 38.

Landsverk kannar saman við Umhvørvisstovuni hvussu marknaskipan kann gerast, og kunnar Tórshavnar kommunu, væntandi í næstum, tá tað málið er greiðari.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eigaraviðurskiftini eru nú komin upp á pláss. Útbjóðingartilfar er gjørt og arbeiðið er nú klárt at bjóða út.

Arbeiðið umfatar, at seta brúnna aftur í uppruna stand herundir:
- Taka burtur asfalt, betongplátu, autoverju og rekkverk
- Reinsa brúnna og reinsa/hampa moldskráar báðu megin brúnna
- Seta upp nýggjar gelendarar fram við brúnni, av tí gamla slagnum
- Umvæla múrverkið, serliga fugur og leggja nýtt asfalt á

Arbeiðið er mett at kosta kr. 1.65 mió. við 6,25% MVG.

Brúgvin verður 100 ára gomul í 2025 og ætlanin er at hon skal verða partur av gøtuskipanini í kommununi.

Útbjóðingartilfarið er j.nr. 18/00173-14

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin innheintar 2 undirhondsboð at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð boðið út sum undirhondsboð til J&K Petersen og Konsax.
Bert eitt tilboð kom inn 6. nov.2019.
J&K Petersen kr. 2.779.702,- u/mvg.

Metingin hjá ráðgevum varð 1,55 mió. kr.
Hendan upphæddin er langt omanfyri metingina, og verður ikki mett ráðiligt at fara undir hetta arbeiðið.0
Brúgvin er við endan av blindum vegi, so endamálið við at seta hana í stand er í høvuðsheitum av mentanarligum týdningi.
Tó má kannast, um loyvi fæst at gera rekkverkið sum tað gamla var, eftirsum gamla rekkverkið ikki fylgir dagsins krøvum í mun til trygd. Sí skjal *18-00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Skjøl:** *18/00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at taka av innkomna tilboðnum, vísandi til at tilboðið er nógv hægri enn kostnaðarmetingin. Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støða til, um farast skal undir bara at gera nýtt rekkverk um brúnna, so tað í størst møguligan mun er sum tað upprunaliga rekkverkið var.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at heimila umsitingini at tillaga tilboðið og/ella at finna eina bíligari loysn, til at skifta bilverjuna út við ein stoypijarns gelendara, og gera kanningar, um asfaltlag kann takast av, so brúgvin kemur aftur at líkjast uppruna útsjónd.

Málið verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina til støðutakan og útvegan av fígging.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt hvussu farast kann víðari fram í málinum.
Semja er um, at til ber ikki bara at taka autoverjuna burtur, og seta gelendara í staðin.
Omaná gomlu brúnni er stoypt ein armerað betongpláta, sum helst er stoypt fyri at javna last frá ferðslu javnt á brúnna, men er eisini ein breiðkan av brúnni, har gamli gelendarin var.
Mett er, at tað rættasta er at biðja arbeiðstakara við serligum hegni at umvæla slíkar laðingar, um at fara undir at umvæla brúnna uppá tímaløn.
Í fyrsta umfari verður mælt til at játta 500.000 kr. til endamálið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 250.000 kr. av konto 6275, L00001 løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan «gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali, endurskapan» og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina um at útvega írestandi 250.000 kr.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta írestandi peningin til umvælingararbeiðið av konto 1313.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð at játta kr. 250.000 av 6275, L00001 løgukarmur fyri árið og kr. 250.000 av konto 1313 til umvælingararbeiðið.

Málið beint víðari til aðru viðgerð í býráðnum.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umvæling av brúnni byrjaði í august 2020, og játtanin til at byrja umvælingararbeiðið, ið varð samtykt 11. juni 2020, er nú brúkt. Fyri at halda fram við arbeiðinum, er tørvur á at játta pening á verkætlanina. Umsitingin hevur, saman við arbeiðstakaranum, tillagað tilboðið soleiðis, at arbeiðið kann gerast liðugt. Partur av arbeiðinum verður tó byggiharraveiting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara, og arbeiðið verður framt sambært omanfyri standandi.
- At kr. 2.500.000 verða fluttar av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, á konto 6275, L62042, Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali.

At málið verður beint í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2020 játtaður til verkætlanina L62042, Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali. Arbeiðið er liðugt, og saldoin á verkætlanini er 384.147 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62042 | Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali | 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | | 384.147 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62042, Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali, flyta avlopið á 384.147 kr. á LK62999, Fríðkan av býnum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 82/23 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 18, Hoyvík - Frá D1 til D3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 39/23 | 23/01128-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 82/23 | 23/01128-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna og Landsstýrið hava gjørt avtalu um at makaskifta skúlabygningarnar á Frælsinum og Hoydølum, sí mál *Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum,* og í tí sambandi skal almenna byggisamtyktin fyri matr. nr. 18, Hoydalar broytast samsvarandi avtaluni.

**Lýsing av málinum**
Partar av økinum, sum ætlanin er at makaskifta, liggja í D1 øki til almenning í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hóast ætlanin í fyrstu atløgu ikki er at byggja nakað afturat í Hoydølum, so er tørvur á at broyta økið til D3 øki til almennar stovnar, soleiðis at møguleiki verður fyri at telja økið við uppí byggi- og nýtslustig, um ynskið verður at umbyggja bygningarnar, og soleiðis at møgulig parkering kann skipast á økinum.

Broytingin av byggisamtyktini er somuleiðis ein fortreyt fyri ummatrikuleringini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum,* journal nr. 22/03066.
- *Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá – matr. nr. 18, Hoyvík,* journal nr. 23/01130.
  Økið er fevnt av serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá, og skal hendan somuleiðis broytast samsvarandi avtaluni.
- *Átekning av servitutti á matr. nr. 18, Hoyvík,* journal nr. 23/01150.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í samband við treytaðu avtaluna millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið viðv. kampusøki á Frælsinum í Tórshavn, er m.a. sett sum treyt, at tann ræðisrættaravmarkandi servitutturin, ið er lýstur á matr. nr. 18, skal strikast av á tí partinum, ið verður makaskiftur.

Tilgongdin at strika servituttin er sett ígongd, við tí fyrivarni at tilgongdin kann gerast tvørlig og long, tí servitutturin er heftur at frílendisætlanini. Strikan ella átekning av servituttinum er avgerandi fyri, at makaskiftið kann fremjast.

Býarskipanardeildin, stjórnarskrivstovan og byggimálsdeildin arbeiða við einum uppskoti, sum verður sent Umhvørvisstovuni.

Talan er um náttúrufriðað øki, og skal broytingin tískil góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
23/01128-2 Eftir broyting
23/01128-2 Áðrenn broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 18, Hoyvík, verður broytt smb. kortskjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og at ræðisavmarkandi servitutturin verður broyttur , ella onnur avtala fæst í lag hesum viðvíkjandi, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 83/23 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá - Matr. nr. 18, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 40/23 | 23/01130-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 83/23 | 23/01130-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna og Landsstýrið hava gjørt avtalu um at makaskifta skúlabygningarnar á Frælsinum og Hoydølum, sí mál *Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum,* og í tí sambandi skal serstaka byggisamtyktin fyri øki fram við Hoydalsá broytast samsvarandi avtaluni.

**Lýsing av málinum**
Partar av økinum, sum ætlanin er at makaskifta, liggja sum náttúrufriðað øki og sum øki til traðir og velt lendi í serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá. Hóast ætlanin í fyrstu atløgu ikki er at byggja nakað afturat í Hoydølum, so er tørvur á at broyta økið til byggiøki, soleiðis at møguleiki verður fyri at telja økið við uppí byggi- og nýtslustig, um ynskið verður at umbyggja bygningarnar, og soleiðis at møgulig parkering kann skipast á økinum.

Broytingin av byggisamtyktini er somuleiðis ein fortreyt fyri ummatrikuleringini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri traðir og velt lendi í serstøku byggisamtyktini fram við Hoydalsá eru m.a.:
- Lendi verður kannað traðabrúki og veltum lutum í høvuðsheitinum so sum sýnt er á viðfestu serkortunum.
- Á økinum skal ikki verða bygt.

Ásetingar fyri náttúrufriðað øki í serstøku byggisamtyktini fram við Hoydalsá eru m.a.:
- Lendið frámerkt á viðfestu serkortunum sum náttúrufriðað øki skulu varðveitast í sínum uppruna náttúrulíki og órógvast sum minst.
- Á økinum skal ikki verða bygt.

Ásetingar fyri byggiøki í serstøku byggisamtyktini fram við Hoydalsá eru m.a.:
- Tó kann á økinum A í frámerkta D2-partinum verða bygt til almennar stovnar (skúla) afturat verandi bygningum eftir ætlan, sum byggimyndugleikin og náttúru- og skógfriðingarmyndugleikarnir hava góðkent.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum,* journal nr. 22/03066.
- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 18, Hoyvík – frá D1 til D3,* journal nr. 23/01128.
- *Átekning av servitutti á matr. nr. 18, Hoyvík,* journal nr. 23/01150.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í sambandi við treytaðu avtaluna millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið viðv. kampusøki á Frælsinum í Tórshavn, er m.a. sett sum treyt, at tann ræðisrættaravmarkandi servitutturin, ið er lýstur á matr. nr. 18, skal strikast á tí partinum, ið verður makaskiftur.

Tilgongdin at strika servituttin er sett í gongd, við tí fyrivarni at tilgongdin kann gerast tvørlig og long, tí servitutturin er heftur at frílendisætlanini. Strikan ella átekning av servituttinum er avgerandi fyri, at makaskiftið kann fremjast.

Býarskipanardeildin, stjórnarskrivstovan og byggimálsdeildin arbeiða við einum uppskoti, sum verður sent Umhvørvisstovuni.

Talan er um náttúrufriðað øki, og skal broytingin tískil góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
23/01130-2 Serstaka byggisamtykt fram við Hoydalsá – Tekstur
23/01130-3 Áðrenn broyting
23/01130-3 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin fyri øki fram við Hoydalsá verður broytt smb. skjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og at ræðisavmarkandi servitutturin verður broyttur, ella onnur avtala fæst í lag hesum viðvíkjandi, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 84/23 Umsókn um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 56ch, Kvíggjartún 8 og 10 á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 38/23 | 22/05301-4 |
| 2 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 84/23 | 22/05301-4 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 56ch, Kvíggjartún á Argjum ynskir at byggja íbúðir á ognini. Matr. nr. 56ch, Argir, liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktin, sum er ætlað miðstaðaendamálum, skúlum, almennum stovnum og íbúðum, og verður bygging í økinum einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at byggja bygning við 17 íbúðum í ymiskum støddum, sí skjal *Tekningar*. Í kjallaranum verða goymslurúm til íbúgvarnar, umframt eitt høli á uml. 60 $m^2$, ið skal vera til útvent miðstaðavirksemi, sum t.d. handil, matstova ella heilsubótarhøli. Tann parturin, sum skal nýtast til miðstaðavirksemi er í eystara enda í niðastu hædd, og verður sostatt tað fyrsta, ið møtir einum, tá man nærkast bygninginum.

Ein ávísur hæddarmunur er á stykkinum, og mett verður ráðiligt at loyva bygging, ið er 4 hæddir í eystara endanum og 3 hæddir í vestara endanum. Aðrar ásetingar viðv. bygging og parkeringsplássum verða smb. ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri C3 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a:
- Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.
- Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein nattúrliga avmarkaðan part av tí.
- Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.
- Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ein serstøk byggisamtykt er frammanundan í sama C3 øki við Kvíggjartún á Argjum, og er hendan galdandi fyri matr. nr. 56cl, har ein almennur stovnur er undir bygging. Heldur enn at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 56ch, er ætlanin at víðka serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 56cl, soleiðis at hon fevnir um báðar matriklarnar.

Um broytingar/nýggjar ætlanir verða á ognum í sama C3 øki á Argjum, er ætlanin, at henda serstaka byggisamtyktin skal víðkast til somuleiðis at fevna um viðkomandi ognir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri heim til børn og ung við autismu við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir*, journal nr. 19/00769.
- *NÝGGJ umsókn um byggiloyvi til Heim í Havn fyri børn og ung við autismu á matr. nr. 56cl, Argir,* journal nr. 21/00687.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Serstaka byggisamtyktin er viðgjørd saman við byggimálsdeildini og teknisku deild, sí skjal *Innanhýsis viðgerð.*

| | Blað nr.: 302 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Formansins merki: |

**Skjøl**
22/05301-9 Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún
22/05301-8 Tekningar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtyktini fyri Kvíggjartún smb. skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

# 85/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mars 2023 | Blað nr.: 305<br><br>Formansins merki: |

## 86/23 Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 135/21 | 21/01258-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 200/21 | 21/01258-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 151/21 | 21/01258-2 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 27.09.2021 | 6/21 | 21/01258-2 |
| 5 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 234/21 | 21/01258-2 |
| 6 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 86/23 | 21/01258-2 |

**Upprunin til málið**
Ynski er um nýggja sethúsaútstykking á Velbastað, og í tí sambandi er skitsa til útstykking á 11 grundstykkir oman fyri Ervaveg gjørd, sí skjal *Útstykking - skitsa*.

**Lýsing av málinum**
Enn er talan bert um skitsu av útstykkingini, men fyri at fáa málið í gongd, verður uppskot gjørt til at broyta byggisamtyktina fyri økið. Økið liggur í K-Landbúnaðarøki. Um sethús skulu byggjast á økinum, má økið broytast til B-sethúsaøki, sí skjal *Eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B-sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.

Ásetingar fyri K-landbúnaðarøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:
- Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telefgrafsamband og í sambandi við vegahald.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um festijørð, sum liggur uttanfyri planlagt byggilendi, og tískil skal málið til hoyringar hjá Búnaðarstovuni og hjá friðingarmyndugleikanum.

Viðmerking er komin frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5.

**Skjøl**
- *Útstykking – skitsa,* journal nr. 21/01258-3.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01258-3.
- Viðmerking frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina sambært skjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá avvarðandi myndugleikum, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi— og býarskipanarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Trónda Sigurðsson, at byggisamtyktin verður broytt sambært skjalinum «skitsa», sum liggur í málinum**.**

Einmælt samtykt**.**

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegnigur og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað hevur ligið til almenna hoyring, er eitt mótmæli innkomið frá einum borgara á Velbastað, sí skjal *Velbastað hoyring matr. nr. 51a og 6a.*
Í mótmælinum verður m.a. víst á at:

- Velbastað er elligomul bygd og í avtaluni um samanlegging av Kirkjubøar sóknar kommunu og Tórshavnar kommunu verður sagt, at bygdirnar skulu varðveitast við sínum sereyðkennum. Við at leggja eina rond av húsum oman fyri býlingin, verður hetta lyftið ikki hildið.
- Norðast í økinum er vakur fossur og suður frá honum eru vakrir hamarsspjallir. Bygging á hesum øki fer at skemma.
- Fleiri óbygd grundstykkir eru tøk, og uml. 5 hektarar av útløgdum byggiøki eru somuleiðis tøkir. Tað átti ikki at verið neyðugt at útlagt meira byggiøki.
- Útstykkingin norðan fyri Royksheyggjarnar, sum kommunan hevði ætlanir um, fekk nógv mótmæli, m.a. grundað av øktari ferðslu á smølu vegunum. Vìst verður til somu mótmæli í smb. við hesa ætlan.
- Viðvíkjandi broytingini av eina stykkinum á matr. nr. 6a verður víst á, at vanliga verður talan um at heildarætlan má gerast fyri eina útstykking. Í hesum føri er talan um okkurt, ið líkist eini einstakaætlan ella “skeggi nær høkuni”.
- Tann vakrasti minnisvarði, ið ein kundi reist á Velbastað, er at friða allan bøin fyri bygging.

Ásannast kann, at ein partur av byggiøkinum á Velbastað er óbygt. Hetta er tó grundað á avbjóðandi lendisviðurskifti og byggilinjur fram við landsvegi, ið gera, at tað er trupult at byggja og gagnnýta lendið

skynsamt. Ervavegur er kommunalur vegur. Tískil ber til at byggja tættari vegnum, lendið kann gagnnýtast betur og sloppið verður undan at gera stórar íløgur í veg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- Broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 51a, Velbastað sambært kortskjalinum *Eftir broyting.*
- Nevndin tekur støðu til, um byggisamtyktin skal broytast fyri matr. nr. 6a, Velbastað sambært kortskjalinum Útstykking – skitsa.
- Beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og halda fast í býráðssamtyktini og at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 27. september 2021:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum, men vil fegin kunnast tá útstykkingarætlanin er liðug. Annars vísa til viðmerkingarnar sum eru sendar inn áður.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann metti seg vera ógegnigan at luttaka í viðgerðini av málinum, og tók býráðið hesa fráboðan til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin kunnar um niðurstøðu hjá Løgtingsins umboðsmanni viðvíkjandi broyting í byggisamtykt og um fráboðan frá Umhvørvismálaráðnum, sum afturkallar góðkenning av broyting av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 6a, Velbastað.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin kunnar um málið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Borgarstjórin kunnnaði um málið.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Elsa Berg |
| Jákup Dam | Gunvør Balle | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen | Birita Baldvinsdóttir Iversen |
| | Helena Dam á Neystabø | |